# MANNALÍV BYRJAR… NÆR?

Neyvan er nakað evnið meira sundurbýtandi og nívandi enn fosturtøka.
Mong halda, at tað er neyðugt, antin at hjálpa kvinnunum ella óføddu børnunum.
Henda bókin vísir hvussu umráðandi tað er, at vit hjálpa báðum.
Á eina beinraknan og ósærandi hátt, megnar rithøvundurin Randy Alcorn,
at geva menniskjaslig og faktuell svar uppá lyklaspurningar
í fosturtøkukjakinum.

www.provita.fo

9 789991 835440



HVÍ VERJA LÍV? – RANDY ALCORN

# HVÍ VERJA LÍV?

Umsorgan fyri
óføddu børnunum
og mammum teirra

RANDY
ALCORN

# HVÍ VERJA LÍV?

*Hví verja lív?*

© Føroya Pro Vita og Randy Alcorn
*Týðing úr enskum:* TEXTUR
*Forsíðumynd:* Miriam & Janus Photography
*Umbróting:* Rógvi Odvørson
*Prent:* Føroyaprent
*ISBN – 978-99918-3-544-0*

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

Randy Alcorn

# Hví verja lív?

## At hava umsorgan fyri teimum óføddu børnunum og mammum teirra

Til Audrey Stout,
ið hevur umsorgan fyri teimum óføddu og mammum teirra,
og sum tók sær av mammu míni, tá hon
lá til tað síðsta í 1981, sjúk av krabbameini.
Tínar góðu gerðir verða ikki gloymdar
av tí Gudi, ið lønir aftur hvørt glas
av køldum vatni, tú gavst í navni Hansara.

**Góði lesari!**

Føroya Pro Vita ynskir við hesi bók at geva tær ein viðførning á leiðini.

Vit vóna, at bókin fer at kveikja tín áhuga og geva tær innlit í eitt sera eymt og viðkomandi evni.

Bókin er upprunaliga skrivað í 2004 av amerikumanninum Randy Alcorn til amerikanska samfelagið. Hóast alt í bókini ikki samsvarar við føroysk viðurskifti, eru evnini tey somu.

Tað er okkara fatan, at rithøvundurin við hesum fáu orðum hevur megnað at lýsa hetta stóra evnið sera væl frá nógvum sjónarhornum.

Vit vilja stimbra kjakið um fosturtøku í Føroyum og geva við hesum okkara ískoyti.

Góðan lesihug!

**Føroya Pro Vita**

# Innihald


**1. partur: Grundin**

**Kap. 1** Hví skulu vit tosa um fosturtøku?

**Kap. 2** Kvinnan ella barnið?

**2. partur: Barnið**

**Kap. 3** Er tað ófødda veruliga eitt menniskja?

**Kap. 4** Hvat er munurin ímillum egg, sáð, embryo og fetus?

**Kap. 5** Er tað ófødda partur av kvinnukroppinum?

**Kap. 6** Hvat siga myndirnar okkum?

**Kap. 7** Hvat gevur einum mannalívi „týdning“?

**3. partur: Kvinnan**

**Kap. 8** Snýr fosturtøka seg veruliga um kvinnurættindi?

**Kap. 9** Hava vit rætt til at velja, hvat vit gera við okkara egna kropp?

**Kap. 10** Er fosturtøka partur av rættinum til privatlív?

**Kap. 11** Skaðar fosturtøka kvinnur likamliga og sálarliga?

**Kap. 12** Er fosturtøka røtt, um lív mammunnar er hótt?

**Kap. 13** Er rætt hjá kvinnu at fáa fosturtøku, um hon verður við barn orsakað av neyðtøku ella blóðskemd?

**4. partur: Onnur týdningarmikil evni**

**Kap. 14** Hvussu við børnum, ið bera brek, og børnum, ið eru óynskt?

**Kap. 15** Fyribyrgir fosturtøka barnamisnýtslu?

**Kap. 16** Persónliga ímóti fosturtøku, men tó fyri fríum vali?

**Kap. 17** Hvussu við ættleiðing?

**5. partur: Andalig sjónarhorn og møguleikar**

**Kap. 18** Kann Gud fyrigeva fosturtøku?

**Kap. 19** At vera fyri lívi – dregur tað burtur frá missiónsboðum Kristusar ella er tað partur av teimum?

**Kap. 20** Hvussu kann eg hjálpa óføddum børnum og mammum teirra?

**Notur**

1. partur

# Grundin

*Kapittul 1*

# HVÍ SKULU VIT TOSA UM FOSTURTØKU?

Eitt umboð fyri National Abortion Rights Action League (NARAL) tosaði á einum miðnámsskúla um fyrimunirnar við fosturtøku. Ein lesandi spurdi læraran, um eg kundi koma at siga eitt sindur um sjónarmiðini, ið tala ímóti fosturtøku. Tá eg so kom eina viku seinni, fekk eg at vita frá læraranum, ið sjálvur tekur undir við fríari fosturtøku, at næmingarnir høvdu atkvøtt 23-1 til fyrimuns fyri fría fosturtøku.

Eg legði tey sjónarmið fram, ið talaðu fyri tí menniskjansliga og rættindunum hjá teimum óføddu børnunum. Eg vísti teimum myndir, ið lýstu menningina hjá tí ófødda heilt frá teimum fyrstu stigunum, tá fosturtøkur verða framdar.

Eftir framløguna segði lærarin við meg: „Um vit skuldu atkvøtt einaferð aftrat, hevði úrslitið verið øðrvísi. Áskoðanir eru broyttar." Síðani legði hann nakað merkisvert aftrat: „Veitst tú hvat? Ikki fyrrenn í dag havi eg nakrantíð hoyrt hesi sjónarmiðini, ið tala ímóti fríari fosturtøku."

Vit rósa okkum fyri, at vit eru víðskygd og geva øllum borgarum eina sømiliga og veruleikagrundaða útbúgving. Og kortini var her ein 55 ára gamal lærari í samfelagsvísindum, ið *ongantíð hevði hoyrt sjónarmiðini ímóti fríari fosturtøku*. Hann hevði góðvarin góðtikið grundgevingarnar fyri fría fosturtøku; og tað høvdu næmingar hansara eisini.

### Óvæntaða rákið

Fyri fáum árum síðani var líkt til, at sjónarmiðini ímóti fosturtøku – vit rópa tey eisini sjónarmiðini fyri lívi – fóru at doyggja út av sær sjálvum. Ung fólk tóktust at vera so djúpt sokkin í moralrelativistiska og tolsemisdrivna postmodernaða samfelagið, at alt bendi á, at øll ung til endans fóru at vera á einum máli um fría fosturtøku. Men óvæntað hevur gongdin í seinastuni verið tann, at alsamt fleiri ung taka frástøðu frá fríari fosturtøku.



Í 2003 vísti ein Gallup kanning, at 72% av tannáringum halda, at fosturtøka er moralskt óhóskandi. Bert 19% halda, at fosturtøka eigur at vera lóglig undir øllum umstøðum, samanborið við 26% av vaksnum. Umleið 32% av tannáringum, samanborið við 17% av vaksnum, halda, at fosturtøka ongantíð eigur at verða loyvd.[1]

Hetta varð seinni staðfest í aðrari landsumfatandi kanning,[2] eins og vaksandi talið á hálvvaksnum, sum luttaka í March for Life[3] ber vitnisburð um tað sama – at rákið er broytt. Fleiri heimasíður eru í dag, ið eggja ungum kvinnum til at velja lívið.[4] Mong ung fólk nokta fyri at góðtaka samfelagsins vernd av fosturtøku.

Í *Hví verja lív?* fari eg at leggja fram menniskjaligar og haldgóðar orsøkir, ið greiða frá og styrkja sjónarmiðini, ið siga okkum, at vit eiga at venda okkum frá fríari fosturtøku til eitt sjónarmið fyri lívi.

### Størsti spurningurin í okkara tíð

Í USA er fosturtøka tann skurðviðgerðin, ið oftast verður framd hjá kvinnum. Fjórðahvørt barn, ið verður gitið í móðurlívi, verður burturbeint við einum ókendum, men vaksandi tali av evnafrøðiligum fosturtøkum.[5] Av tí at 50% av kvinnunum, ið gerast við barn, eru tað ótilætlað, merkir tað, at helvtin av øllum kvinnunum, ið ótilætlað gerast við barn, fáa fostrið tikið. Tað eru á leið 1.370.000 fráboðaðar fosturtøkur í USA hvørt ár.[6] Í USA hava ella fara 43% av øllum kvinnum í barnsburðaraldri at fáa fostur síni tikið.[7] Í roynd og veru hava allar familjur á ein ella annan hátt verið merktar av fosturtøku.

Tað er sera nógv í váða í fosturtøkuspurninginum. Um sjónarmiðini fyri fríari fosturtøku eru røtt, so er frælsið at velja fosturtøku ein grundleggjandi borgarligur rættur. Um sjónarmiðini fyri lívi eru røtt, so eru tær 3753 fosturtøkurnar, ið verða framdar hvønn dag í USA, at rokna sum menniskjaoffur. Tað er meir enn øll tey, ið lótu lív 11. sept.

2001, tá World Trade Center varð lagt í oyði. Fosturtøka er tað „heitasta" evnið í dag. Sig orðið, og djúpar kenslur verða rørdar. Millum evni, ið eru átrokandi hjá fólki, er fosturtøkuspurningurin ovastur – oman fyri jødahatur, rúsdrekkamisnýtslu, heimloysi, deyðarevsing, pornografi o.a.[8]

Fyri stuttum vísti ein Gallup kanning, at 26% av amerikanarunum søgdu seg sjálvandi stuðla fríari fosturtøku, og 29% søgdu seg vera harðliga ímóti. Samanlagt merkir hetta, at 55% av amerikanska fólkinum meta fosturtøku vera eitt tað týdningarmesta evnið, ið støða kann takast til, og meiningarnar fyri og ímóti eru mestsum javnt býttar.[9]

Av tí at hini 45% ikki hava nakra avgjørda meining um evnið, og av tí at fleiri, ið einaferð vóru avgjørd, hava broytt meining, so kann helvtin av amerikanska fólkinum verða ávirkað í teirra hugsan um fosturtøkuspurningin.

**Kristiligt sjónarmið**

Onkur kristin lesari hugsar helst: „Henda bókin er ikki ætlað mær, men hinum, ið ikki eru í kirkjum og samkomum – tað eru tey, ið fáa fostrini burturbeind.“ Í veruleikanum eru tað 43% av kvinnunum, ið hava fingið fosturtøku, ið siga seg vera protestantar, og 27% siga seg vera katolikkar. Tað merkir, at tveir triðingar av øllum, sum fáa fosturtøku í USA, hava kristiligt tilknýti. 18% av øllum, sum fáa fosturtøku í USA, siga seg vera endurføddar ella evangeliskt kristnar.[10] Tað er næstan hálv millión fosturtøkur hvørt ár í bíbliutrúgvum kirkjum. Tað snýr seg ikki um, at kirkjan má tosa við heimin um fosturtøkuspurningin. Kirkjan má tosa við seg sjálva fyrst – og *síðani* við heimin.

Hóast eg eri kristin, geri eg ikki nógv við at grundgeva við støði í Bíbliuni í hesi bók. (Tað havi eg gjørt aðrastaðni).[11] Próvtilfarið, eg her beri fram, er grundað á læknafrøðilig vísindi og álítandi sálarfrøðiligar kanningar. Hesar keldur áttu at verið líka álítandi fyri ein og hvønn agnostikara, ið virðir sannleikan, sum tær eru fyri kristin. Eitt er heilt vist: tað eru mong, ið ikki eru kristin, ið eru ímóti fosturtøku.

Eg stuðli kvinnurættindum. Eg havi djúpastu virðing fyri konu míni og døtrunum, ið vit í felag hava uppalt til at virða seg sjálvar og at vera takksamar fyri, at Gud skapaði tær sum kvinnur. Eg vil ikki undirdríva teir sálarløstir, ið kvinnur hava fingið orsakað av teimum avgerðum, ið hava við fosturtøku at gera. Men tó skilir ongin líðing betur enn Jesus Kristus, ið er fullur av náði og sannleika. Kapittulinum at finna Guds fyrigeving (kap. 18) er ein, ið eg havi líka nógv brúk fyri sum nakar annar.



Henda bókin leggur fram sannroyndir og skynsemi og hevur til endamáls við kærleika og náði at geva okkum eina góða og sunna fatan av veruleikanum.

**Mín áheitan til lesaran**

Um tú ert fyri fríari fosturtøku og lesur hesa bók, so vóni eg, at tú hevur eitt opið sinni. Um sjónarmiðini ímóti fríari fosturtøku – ella fyri lívi, sum vit eisini nevna tey – vísa seg at vera uttan vit og skil og einans styrkja tína støðu fyri fosturtøku, so er tað í lagi. Tú kanst geva sjónarmiðunum fyri lívi ta fordøming, tey hava uppiborið. Men um sjónarmiðini hinvegin vísa seg at vera skilagóð, so biði eg teg um at umhugsa tína støðu.

Um tú ert ein av teimum mongu ivandi og hevur blandaðar kenslur hesum viðvíkjandi, so heiti eg á teg um at brúka hesa bók í tínari leitan eftir sannleika. Tú hoyrir sjónarmiðini fyri fríari fosturtøku allastaðni – tendra bara sjónvarpið ella les bløðini. Við hesari bók hevur tú kanska tín einasta møguleika fyri at seta teg inn í sjónarmiðini fyri lívi.

Ert tú ímóti, biði eg teg um at grunda yvir tína støðu. Tað er ikki nóg gott at siga: „Eg veit, eg havi rætt; men eg eri ikki vísur í hví.“ Vit eiga at grunda okkara hugsanir á prógvini. Um vit fara skeiv í onkrum, mugu vit sjálvsagt endurskoða okkara støðu. Um vit hava rætt, mugu vit læra okkum at kunna onnur á skynsaman hátt. Eitt er vist: Um fosturtøka veruliga drepur børn og skaðar kvinnur, tá er ov nógv í váða til einans at standa í útjaðaranum og onki gera.

*Kapittul 2*

# KVINNAN ELLA BARNIÐ?

Kona mín og eg komu upp í virksemið, ið arbeiðir fyri lívi, tí vit bóru ótta fyri teimum mongu kvinnunum, ið komu illa fyri av fosturtøkum. Í 1981 tóku vit eina unga barnakonu inn til okkara at búgva. Hon var bert hálvvaksin. Eg sat í stýrinum fyri einum av teimum fyrstu stovnunum, ið veitti neyðstøddum, ørkymlaðum og vónleysum barnakonum hjálp. Og besti hátturin at hjálpa hesum kvinnum var at vísa teimum á aðrar møguleikar enn júst fosturtøku.

Sum tíðin gekk, gjørdist eg partur av arbeiðinum at upplýsa og kunna um sjónarmiðini fyri lívi. Eg gjørdist politiskt virkin, og eg tók lut í friðarligum mótmælisgongum uttan fyri læknastovur, ið framdu fosturtøkur. Summi savna seg um at bjarga óføddum børnum, onnur um at hjálpa barnakonum. Eg metti báðar uppgávurnar at hava eins stóran týdning.

## Rørslan, tú møguliga ikki kennir

Óteljandi mýtur hava verið knýttar at rørsluni fyri lívi. Eitt dømi er tann ofta endurtikni pástandurin: „Tey, sum eru ímóti fosturtøku ella fyri lívi, leggja hvørki nakað í kvinnuna, ið er við barn, ella í barn hennara, eftir at tað er komið í heimin." Ein sjónvarpstíðindakvinna kom til mín á einum tiltaki fyri lívi og spurdi, hvat eg segði til hesa skuldseting. Eg segði: „Jú, sært tú, kona mín og eg bjóðaðu einari ungari gentu, ið var við barn, inn til okkara at búgva; vit rindaðu fyri hennara útreiðslur, meðan hon búði hjá okkum. Vit stuðlaðu henni, tá hon valdi at geva barnið frá sær. Og nú tú spyrt, so kann eg eisini siga, at vit geva ein fittan part av okkara inntøku til at hjálpa kvinnum og børnum, ið eru komin illa fyri."

Síðani vísti eg tíðindakvinnuni ein samkomuleiðara, ið stóð beint hjá, sum saman við konu síni hevur ættleitt 19 børn, harav nøkur við Down syndromi og øðrum serligum tørvum.



Tíðindakvinnan gav upptøkumanninum tekin um at gevast við at filma. Eg spurdi, um hon vildi tosa við vinmann mín, samkomuleiðaran.

Hon risti við høvdinum og helt leiðina fram. Veruleikin er hesin: Felagsskapir fyri lívi í túsundatali kring USA og kring allan heimin bjóða ókeypis gitnaðarroyndir, ultraljóð, ráðgeving, stuðulsbólkar, vegleiðing í barnaumsorgan, fíggjarliga ráðgeving, daddur, blæur, barnaklæði og bústaðir. Har afturat kunnu leggjast tær tíggjutúsundatals kirkjur og samkomur, ið hjálpa neyðstøddum barnakonum, støkum mammum og lágløntum familjum við mati, peningi, húsaumvælingum og mongum øðrum. Óteljandi fólk, ið vilja verja lív, ættleiða børn og hjálpa sjálvboðin børnum, eftir at tey eru fødd. Tilsamans umfatar hetta heimsins størstu sjálvbodnu grasrótarrørslu.

Kvinnur mugu gjalda fyri at fáa fosturtøku, men alternativini fyri lívi eru ókeypis og fara fram í kærleika og uttan hóvasták. Øvugt summum ákærum eru hesi fólk ikki bert fyri føðing – tey eru fyri lívi. Tey hava umsorgan fyri barninum og taka sær av bæði tí og mammuni, og tey hjálpa teimum báðum, ikki bert undan føðing, men eisini eftir.

## Okkara tjóðarskisofreni

Hóast býtið er javnt millum tey, ið siga seg vera fyri fríari fosturtøku, og tey, ið siga seg vera fyri lívi, so eru tað tó 2/3 av amerikanska fólkinum, ið meta fosturtøku at vera „moralskt óhóskandi."[12] Nøkur talsfólk fyri lívi hava tulkað hetta soleiðis, at tað ikki er neyðugt longur at vísa á, at tað ófødda er menniskja, ella at fosturtøka er skeiv, men at vit heldur eiga at leggja dent á at hjálpa kvinnum at síggja, at fosturtøka ikki er til teirra egna besta.

Eg taki heilt avgjørt undir við, at vit eiga at hjálpa kvinnum, ið ótilætlað eru vorðnar við barn, at síggja, at fosturtøku fer at skaða tær, ikki at hjálpa teimum. Nógvar kvinnur halda, at fosturtøka er skeiv, men at tað ikki er tað ringasta – men ringt, sum tað er, so halda tær, at tað tó er eitt betri alternativ enn at bera eitt barn í heimin, betri enn at uppala eitt barn og betri enn at geva eitt barn burtur til ættleiðingar.[13] Vit mugu vísa teimum, at hóast alternativini til fosturtøku eru avbjóðandi, so er

fosturtøkan tað, ið drepur eitt menniskja. Hetta er júst tann orsøkin, ið hevur tær mest neiligu avleiðingarnar fyri eina kvinnu.

Men mong teirra, ið trúgva, at tey óføddu eru menniskju, og at fosturtøka er ómoralsk, velja at fáa fosturtøku og verja eisini sjónarmiðini fyri fríari fosturtøku. Hetta vísir, at tey ikki rokna tey óføddu at vera menniskju á sama hátt sum eitt nú trý ára gomul børn. Tey meta ikki, at fosturtøka er ómoralsk á sama hátt sum eitt nú at drepa eitt trý ára gamalt barn.

Kanningar benda eisini á, at mong teirra, ið halda, at fosturtøka er ómoralsk, halda tó, at fosturtøka eigur at vera lóglig. Tey halda helst eisini, at neyðtøka, barnamisnýtsla og morð eru ómoralsk – men tey høvdu heilt vist ikki farið at grundgivið fyri, at neyðtøka og morð áttu at verið lóglig. Hetta vísir ein grundleggjandi mun á, hvat tey meina við, tá tey siga, at neyðtøka og morð eru „ómoralsk", og tá tey siga, at fosturtøka er „ómoralsk".

Ongin, ið roknar tey óføddu at vera fullbúgvin menniskju, kann við viti og skili verja løggilda fosturtøku, uttan so at viðkomandi eisini er fyri at drepa eitt annað menniskja. Ein og hvør grundgeving fyri fosturtøku, ið vil tekkjast mammuni við at nýta orð sum órógv, strongd og fíggjarlig byrða í sambandi við barnauppaling, kann eins sannførandi nýtast um hennara tólv ára gamla son, mann hennara ella foreldur hennara. Í nógvum førum eru eldri børn dýrari og meira krevjandi enn eitt óføtt barn. Uttan at himprast kveistra fólk hasar grundgevingar burtur, tá talan er um at drepa eldri børn.

Ofta siga kvinnur seg onga hóming hava av, hvør var inni í teimum, tá tær fingu fosturtøku. Nakrar hava havt ein ótilvitaðan varhuga av, at tær bóru eitt barn, men læsa seg fastar í ómenniskjaliga orðaleikin fyri fosturtøku. Men nú angra tær tað. Tær meta tað, sum tær gjørdu, at hava verið fyribils sinnissjúka, sum hevur verið eggjað til av vælmeinandi, men villleiddum, vinfólki og familju. Nú høvdu tær ynskt, at onkur var, ið royndi at tosa tær frá at gera eitt val, ið nú plágar tær.

Vit eiga at vera góð við barnakonur, ið kenna seg kroystar til fosturtøku, og hava umsorgan fyri teimum. Vit eiga eisini at vera góð við kvinnur, ið hava fingið fosturtøku, og gera alt, vit kunnu, fyri at



hjálpa teimum at koma fyri seg aftur eftir teir sálarløstir, ið oftast fylgja við einari fosturtøku.

Orðtøk Sálomons siga okkum, at rætta valið er altíð skilagott og hevur góðar avleiðingar, men skeiva valið er tápuligt og hevur ringar avleiðingar.

### Skeiva sundurbýtið

Tað er ongantíð til fyrimuns fyri nakran at drepa eitt barn. Tá eitt barn verður sært av mammu síni, nívir tað ikki bert barnið, men eisini mammuna. Tað er ómøguligt at skilja vælveruna hjá einari mammu frá vælveruni hjá barni hennara. Líður barnið, so líður mamman við. Og júst tí at tað ófødda er eitt barn, eru avleiðingarnar av at drepa tað sera álvarsamar. Tað er samleikin hjá tí fyrsta offrinum, barninum, ið ber líðingina yvir á næsta offrið, mammuna. Júst tí mugu vit byrja okkara viðgerð av fosturtøkuspurninginum við samleikanum hjá tí ófødda.

2. partur

# Barnið

*Kapittul 3*

# ER TAÐ ÓFØDDA VERULIGA EITT MENNISKJA?

Talsfólk fyri fríari fosturtøku plagdu at siga: „Tað er óvist, nær eitt mannalív byrjar. Hetta er ein religiøsur spurningur, ið vísindini ikki kunnu svara.“ Men flest øll eru farin frá hesi støðuni, tí hon er avsannað av fleiri áratíggju gomlum vísindaligum prógvum. Men kortini er henda avoldaða trúgvin so mikið inngrógvin í okkara tjóðarsál, at tað enn eru mong, sum trúgva tí.

Einasti hátturin, har logikkurin fyri fríari fosturtøku kann vinna, er, um fólk trúgva, at tey óføddu ikki eru heil menniskju.
Eru tey tað?

## Hetta siga vísindini

Dr. Alfred M. Bongioanni, professari í burðarfrøði á University of Pennsylvania, segði: „Tá eg fór undir læknafrøðiligu útbúgving mína, lærdi eg, at mannalív byrjar við gitnaðarstund ... mannalívið er hjástatt allan vegin ígjøgnum, heilt frá gitnaðarstund og til vaksnamannaárini... eitt og hvørt inntriv í hesum tíðarskeiði merkir at taka eitt mannalív.“

Um byrjanarstigini í menningini hjá børnum í lívmóðurini segði Bongioanni professari: „Eg eri ikki meiri til reiðar at siga, at hesi byrjanarstig í menningini avmynda eitt ófullkomið menniskja, enn eg eri at siga, at eitt barn áðrenn øgiligu ávirkanina av kynsbúningaraldrinum ikki er eitt menniskja. Tað er mannalív á øllum stigum.”[14]

Dr. Jerome LeJeune, táverandi professari í arvafrøði á Université Paris Descartes, segði: „Eftir at gitnaður er farin fram, er eitt nýtt menniskja vorðið til.“ Hann segði, at „hetta er ikki longur ein spurningur um meining. Eitt og hvørt menniskja hevur eina serstaka byrjan – við gitnaðarstund.”[15]

Micheline Matthews-Roth, professari við Harvard University Medical School, segði: „Vísindaliga er tað rætt at siga, at eitt mannalív byrjar við gitnaðarstund.”[16]



Eitt og hvørt menniskja verður skapað við gitnaðarstund. Áðrenn gitnaðarstundina er menniskjað (við tess serstaka DNA) ikki til. Men frá hesi stund er menniskjað til.

Tað eru ikki bert fólk, ið eru fyri lívi, ið hava hesa støðu. Eigarin av størstu fosturtøkuklinikkini í Oregon vitnaði soleiðis undir eiði: „*Sjálvandi* byrjar menniskjalívið við gitnaðarstund.”[17] Heiðurslønta verðsliga bókin *Frá gitnaði til føðing* lýsir gjølliga byrjanina hjá einum barni við gitnað, og hvussu tað mennist fram til føðing.[18]

Hvussu greið eru prógvini um, at mannalív byrjar við gitnaðarstund? So greið, at Missouri General Assembly viðtók eitt lógaruppskot, ið segði: „(1) Eitt og hvørt menniskjalív byrjar við gitnaðarstund; (2) ófødd børn koma undir verjuáhugamál av lívi, heilsu og vælveru ... orðingin ‘ófødd børn’ ella ‘óføtt barn’ skal fata um øll ófødd børn ella avkom menniskjanna frá gitnaðarstund og øll lívfrøðiligu menningarstigini á leiðini fram til føðing.”[19]

## Samansett og menniskja

Eitt nýgitið egg hevur í sær eina øgiliga rúgvu av genetiskum upplýsingum, nóg mikið til at stýra menningini og vøkstrinum hjá tí einstaka alt lívið. Ein einstakur tráður av DNA í einari menniskjakyknu hevur so nógvar upplýsingar, at tað svarar til eitt heilt bókasavn við 100.000 bókum.[20]

Kyknurnar fara sundur og margfaldast við rúkandi ferð, og úrslitið er ein framúrskarandi vøkstur. Tað er vøkstur, tí tað er lív. Langt áðrenn ein kvinna veit av, at hon er við barn, er longu í henni eitt livandi og vaksandi menniskja.

Millum fimm og níggju dagar eftir gitnað festir hetta nýggja menniskjað seg í lívmóðurveggin fyri at tryggja seg og fáa føði. Longu her kann kynið síggjast við hjálp av serligum tólum. Eftir fjúrtan døgum framleiðir barnið eitt hormon, ið steðgar mánasjúkuni hjá mammuni. Tvær vikur eftir hetta hómast menniskjalig eyðkenni – og tríggjar mánaðir seinni eru eyðkennini heilt eyðsædd. Barnið ein fullborin partur av mannaættini.

Við gitnað tykist tað ófødda okkum ikki at vera eitt menniskja, tí vit eru von at døma menniskju eftir útsjónd. Men í uttanveltaðari vísindaligari merking er tað líka nógv eitt menniskja sum eitt eldri barn

ella ein vaksin. Hetta ófødda barnið sær út, sum tað eigur at síggja út á tí stigi í menningini, tað er á.

18 dagar eftir gitnað verður hjartað myndað, og eyguni byrja at mennast. 21 dagar eftir gitnað pumpar hjartað blóð ígjøgnum kroppin. Eftir 28 døgum eru knubbar komnir á, har armar og bein fara at verða. Eftir 30 døgum hevur barnið ein heila og er margfaldað í stødd 10.000 ferðir.

Eftir 35 døgum verða muður, oyru og nøs myndað. Eftir 40 døgum kunnu heilabylgjur ófødda barnsins verða máldar, og hjartaslátturin, ið byrjaði tríggjar vikur frammanundan, kann longu hoyrast við ultraljóðstetoskopi. 42 dagar eftir gitnað er beinagrindin myndað, og tá stýrir heili barnsins vøddum og gøgnum.

Sama hvussu hann ella hon sær út, fer eitt barn altíð at vera eitt barn. Fosturtøka fer altíð at gera enda á lívinum hjá einum barni. Tey fyrstu amboðini at fremja fosturtøku, íroknað allir teir ymsu angribollarnir o.a., eru ov sein, um sleppast vil undan at beina fyri einum lívi.

**Leikur lívsins**

Lennart Nilsson, best kendur fyri sínar innvortismyndir í tíðarritinum *Life* og bók síni *A Child is Born*, sigur í „Drama of Life Before Birth“ soleiðis um tað ófødda barnið 45 dagar eftir gitnað. (áðrenn nógvar av kvinnunum vita, at tær eru við barn): „Hóast fostrið nú bert vigar umleið eitt gramm, hevur tað longu fingið øll tey innaru gøgnini, sum eitt vaksið menniskja hevur, men tó á øðrum menningarstigum. Tað hevur longu ein lítlan munn við varrum, eina byrjandi tungu og knubbar til tjúgu mjólkatenn. Kynið og nøringargøgnini eru byrjað at mennast.”[21]

Eftir átta vikum hava hendur og føtur fingið næstan fullkomið skap. Eftir níggju vikum boyggir barnið fingrarnar um ein lut, ið verður lagdur í lógvan. Fingraneglir verða myndaðar, og barnið suttar tummil. Eitt níggju viku gamalt barn dugir „longu at bólta rút bæði aftureftir og frameftir og at saksasparka“.[22]

Tað ófødda reagerar upp á sansingarávirkan og er møguliga longu ført fyri at kenna pínu.[23]

Eftir 10 vikum skeitir barnið, svølgir og rykkir brýr. Eftir 11 vikum pissar tað og ger fleiri andlitsbrøgd – og enntá smílist.[24] Eftir 12 vikum sparkar barnið, snarar fótunum, spælir við táunum, knýtir nevarnar, flytur tumlarnar, bendir handliðirnar og letur munnin sundur.[25]

Alt hetta fer fram tríggjar teir fyrstu mánaðirnar eftir gitnaðarstundina. Í teimum írestandi seks mánaðunum í móðurlívi fer ongin nýggj menning fram, og onki nýtt byrjar at virka. Alt barnið einans veksur og búnast – uttan so at talan gerst um fosturlát, ella at tess lív verður tikið við fosturtøku.

Tað er vísindaliga prógvað, at allar fosturtøkur í Amerika steðga einum bankandi hjarta og einum heila, ið longu virkar.

Hvat kalla vit tað, tá eitt fólk ongan hjartaslátt hevur, ella hevur ein óvirknan heila? Vit kalla tað deyði!

Hvat eiga vit at kalla tað, tá vit hava hjartaslátt og virknan heila? Vit eiga at kalla tað lív! Hvør einstøk fosturtøka tekur eitt lív.

**SMUS**

„Svarið uppá spurningin: ‘Hvat er tað?’, hevur størsta týdningin,“ sigur Scott Klusendorf.[26] Hann vísir á, at tað eru bert fýra munir á einum óføddum og einum nýføddum. Hesir munir eru lættir at minnast við stavorðunum SMUS,[27] ið eg skal greiða frá her í stuttum:

*Stødd*: Sigur støddin hjá tær nakað um, hvør tú ert?

*Menningarstig*: Eru 20 ára gomul meiri menniskju enn 10 ára gomul, av tí at tey eru klókari og sterkari?

*Umhvørvi*: Ger tað teg meira ella minni til eitt fólk at vera innandura enn at vera uttandura? Verður eitt barn minni menniskja av at vera inni í mammuni enn at vera uttanfyri?

*Sjálvbjargnistilgongd*: Avger ávíst tilknýti til annað fólk, hvør tú ert? Er ein við Alzheimer ella aðrari sjúku minni menniskja av tí? Eri eg, ein insulinbundin sukursjúkur, minni menniskja nú, enn áðrenn eg fekk sjúkuna?

Eitt tríggjar mánaða gamalt barn er væl minni enn eitt tíggju ára gamalt, nógv minni ment og líka hjálparleyst sum eitt óføtt barn.

Spurningurin er ikki, hvussu gomul ella stór ella klók ella ótilætlað tey óføddu eru, men *hvørji* tey eru.

Svarið er einfalt – tey eru menniskju!

*Kapittul 4*

# HVAT ER MUNURIN ÍMILLUM EGG, SÁÐ, EMBRYO OG FETUS?

Tvey ár frammanundan, at fosturtøka gjørdist lóglig í Amerika, gav ein forsprákari fyri fríari fosturtøku sjúkrasystrum leiðbeining í einum víðagitnum læknafrøðiligum tíðarriti, har hann segði: „Við málbrúki, hugtøkum og lógum kann almenni tankin um fosturtøku skiljast frá almenna tankanum um morð.“[28] Sama ár bjóðaði ein vísindalig ráðstevna í Los Angeles venjing í málbrúki, har m.a. varð sagt: „Um tú sigur: 'Súgv barnið út', fer tað lættliga at hava við sær ella økja um ein sálarligan stoyt; tí skalt tú heldur siga: 'Tøm lívmóðurina,' ella 'vit fara at skava innan úr lívmóðurini.' Men sig aldri: „Vit skulu skava barnið burtur úr lívmóðurini.'“[29]

Mál er ikki bert at siga tað, ið hugsað verður, tað myndar eisini hugsan. Hvussu orð verða brúkt, ávirkar okkara fatan av einum tanka – eisini einum andstyggiligum tanka.

Orð, ið savna seg um barnakonuna og lívmóðurina, flyta áhugan frá persóninum inni í barnakonuni. Men sama hvussu vit siga tað, fer „tøming av lívmóðurini“ ella „at steðga viðgongutíðini“ altíð at gera enda á einum mannalívi.

Ein feministur, ið er fyri lívi, segði, at „tey, ið eru fyri lívi, eru ikki ímóti at steðga einari viðgongutíð. Viðgongutíðir eru bert ætlaðar at vara í stutta tíð. Vit eru fyri at enda tær eftir umleið níggju mánaðum. Vit eru bara ímóti at drepa børn.“[30]

### *Fetus*, hvat merkir tað?

Eins og *smábarn* og *unglingi* sipa *embryo* og *fetus* ikki til ikki-menniskju, men til menniskju á ávísum menningarstigum. *Fetus* kemur úr latíni og merkir „avkom“, „unglingi“ ella „smábarn“.

Tað er vísindaliga skeivt at siga, at eitt menniskjafostur, embryo ella fetus, ikki er menniskja av teirri orsøk, at tað ikki er líka nógv ment sum



ein nýføðingur. Tað er sum at siga, at eitt smábarn ikki er eitt menniskja, tí tað ikki enn er ein unglingi. Onnur dóttir mín er tvey ár eldri enn hin. Merkir tað, at hon er tvey ár betri? Gerst tú meira menniskja, so hvørt sum tú veksur? Um so er, eru vaksin meiri menniskju enn børn, og kurvabóltsleikarar eru meira menniskju enn kappríðarar. Eitthvørt ikki-menniskja verður ikki menniskja, so hvørt sum tað verður eldri og størri. Tað, sum er menniskja, er menniskja heilt frá byrjan.

### Er eitt egg ella sáð ein persónur?

Carl Sagan speirak fosturtøkumótstøðufólk við at spyrja: „Hví er tað at oyðileggja sáð ella egg ikki at drepa?“[31] Svarið, sum eitt og hvørt vísindafólk átti at vitað, er, at tað er ein grundleggjandi munur á sáði og ógitnum eggum og á gitnum eggum ella kynskyknum.

Eins og kyknur í hári ella hjarta, so hava egg ella sáð ikki møguleika at gerast annað enn tað, tey eru. Men tá egg og sáð verða sameind, byrjar eitt nýtt, virkið, serstakt mannalív við sínum egnu ílegum. Hetta lívið er hvørki egg ella sáð, heldur ikki ein einføld blanding av báðum. Eitt gitið egg er eitt nýgitið menniskja. Tað er ein persónur við sínum egna lívi og í skjótari menning. Við gitnaðarstund er í hesi fyrstu einstøku kyknuni øll tann fullfíggjaða genetiska heildarmyndin. Hetta umfatar alla menning menniskjans – kyn, hár- og eygnalit, hædd og húðarlit.[32] Skil hesa einstøku kyknuna frá nýgitnu kynskyknuni, legg hana við síðuna av einari sjimpansukyknu, og „ein genetikari kann við eitt gera av, hvør er menniskja og ikki. Tað menniskjaliga er longu her heilt týðiligt.“[33]

„Gitnaðarúrslitið“ (Product of conception – POC) er ein vanlig ómenniskjansliggerðing av tí ófødda barninum. Nýføðingurin, unglingurin og tann vaksni eru í veruleikanum øll „gitnaðarúrslit“ eins og lítla fostrið. Eins og úrslitið av rossagitnaði altíð er eitt ross, soleiðis er úrslitið av menniskjagitnaði eisini altíð eitt menniskja.

Kjakið um ófullbornar upprunakyknur (stamcellur) er eitt dømi um at orð og heitir hava vald. Upprunakyknur eru fjølbroyttar høvuðskyknur, ið fleiri ymisk sløg av vevnaði og gøgnum koma úr. Um vaksin samtykkja tað, ber til at fáa fyrstafloks tilfar til lívlæknafrøðiliga gransking úr góðkynjaðum menniskjatilfari, sum eitt nú blóð úr nalvastrongi og

eftirburði. Men tó eru nógv vísindafólk, ið halda fast við at brúka upprunakyknur úr ófullbornum børnum, sum missa lívið í hesi atgerð. Hetta etiska kjakið hevur álvarsama ávirkan á, hvussu vit síggju menniskju, og um tey kunnu týnast fyri at gagna øðrum.[34]

Hugvekjandi metti National Institute of Health (NIH), at almenningurin var ímóti „upprunakyknugransking av fosturkyknum,“ ið oyðileggur fostur í royndarkanningum. So NIH valdi eina nýggja orðing at lýsa neyvt tað sama: „Fleirvirkin upprunakyknugransking.“ [35] Nýggja orðingin krógvar burtur veruleikan, at menniskjafostur verða nýtt til royndargransking. Heldur enn at steðga einum óetiskum framferðarhátti valdu tey eitt annað heiti.

**Ongin ivi**

Um tað fer at eydnast at klona menniskju, fer ein persónur at gerast partur av eini lívsleið einaferð eftir gitnað. Hetta fer tó ikki at røra við hansara støðu sum menniskja. Tað er hjáveran hjá persóninum á lívsleiðini, ið hevur týdning, ikki hvussu hann kom hagar. Dr. Thomas Hilgers sigur: „Ongin einstakur livandi kroppur kann 'gerast' ein persónur, uttan so at hann longu er ein persónur. Ongin livandi vera kann gerast nakað annað enn tað, hon í grundini er.“[36] Tey, ið fremja fosturtøkur, eru vorðin meira opin um, hvat hendir í sambandi við fosturtøkur. Dr. Warren Hern, ið lærir læknar at fremja fosturtøkur, segði soleiðis um sítt arbeiði:

> Eg fór undir at taka fostrið hjá einari ungari kvinnu, ið var komin 17 vikur... Eg førdi tongina inn í lívmóðurina, legði tongina um høvdið á fostrinum, ið enn var á lívi – fosturinnsprænig verður ikki nýtt, tá tú ert komin seytjan vikur. Eg kroysti um tongina og knústi høvdið á fostrinum.
> Fostrið, sum nú var deytt, gleið út óskalað.[37]

Hesin maður, ið hevur halgað sítt lív til at fremja fosturtøkur og at upplæra onnur í at fremja tær, ivast onga løtu í, at hvør einstøk fosturtøka drepur eitt barn.
Veitst tú nakað, sum hann ikki veit?



*Kapittul 5*

# ER TAÐ ÓFØDDA PARTUR AV KVINNUKROPPINUM?

Heimspekingurin, Mortimer Adler, segði, eins og fleiri onnur hava sagt, at tað ófødda er „ein partur av kvinnukroppinum á sama hátt, sum ein armur ella eitt bein er ein partur av einum kroppi. Avgerðin um at skera burtur ein arm ella eitt bein fellur undir tað privata økið – frælsið at gera, sum einum lystir í øllum, sum ikki er til skaða fyri onnur.”[38]

**Rætt ella skeivt?**

Ein kropslutur verður avmarkaður av felags genetisku kotuni, hann og restin av kroppinum hevur. Allar kyknur í svølgi, hjarta, lungum o.ø. hjá mammuni hava somu genetisku kotu. Ófødda barnið hevur eisini eina genetiska kotu, men hon er skilliga ein onnur enn tann hjá mammuni. Hvør kykna í ófødda kroppi barnsins er fullkomiliga barnsins egna. Hvør einasta kykna barnsins er ólík kyknunum hjá mammuni. Ofta er blóðflokkurin ein annar og somuleiðis kynið.

Um kvinnukroppurin er tann einasti, sum viðgongutíðin viðvíkur, royn so at hugsa um teir kropslutir, hon má hava: Tvær nasar, fýra bein, tvinni fingramerki, tveir heilar, tvey blóðrensl og tvær beinagrindir. Á leið aðru hvørja ferð má hon eisini hava mannlig kynsgøgn. Um tað ikki ber til hjá eini kvinnu at hava mannlig kynsgøgn, so kann drongurin, hon ber, ikki bert vera ein partur av hennara egna kroppi.

Ein kinversk kynskykna í einari svenskari kvinnu fer altíð at vera kinversk, ikki svensk, tí samleikin er grundaður í hennara genetisku kotu, ikki tí hjá kroppinum, har hon heldur til.

Eitt barn kann doyggja og mamman liva, eins og mamman kann doyggja og barnið liva. Hetta vísir bara, at talan er um tveir ymiskar einstaklingar.[39]

Undir skurðviðgerðum áðrenn barnsburð verður tað ófødda, sum framvegis er knýtt at mammuni við nalvastronginum, tikið úr, doyvt,

skurðviðgjørt og lagt í aftur mammuna. Barnið verður kallað sjúklingur, verður skurðviðgjørt og hevur sína egnu sjúkradagbók, ið vísir blóðflokk og lívstekin.

Í 1999 varð eitt óføtt barn, Samuel Armas, skurðviðgjørt fyri mønulop. Myndin av honum í tíðarritinum *Life* fekk nógva umrøðu kring allan heim. Tá skurðlæknin var um at lata skurðin aftur, trýsti lítli Samuel hond sína út úr lívmóðurini og tók um fingur skurðlæknans. Myndamaðurin, Michael Clancy, filmaði hesa ótrúligu hending. Clancy greiddi soleiðis frá: „Knappliga stakk ein armur seg út úr opinum og tók seg so aftur, til bert hondin var sjónlig. Læknin tók í hondina, sum reageraði við at kroysta um fingur læknans. Fyri at kenna styrki barnsins risti læknin spakuliga lítla nevan. Men Samuel helt fast. Og eg fekk myndina! Ófatiligt!“[40]

Samuel Armas varð lagdur í aftur lívmóðurina og varð føddur næstan fýra mánaðir seinni. Hvørja ávirkan hevði tað á Clancy at síggja Samuel taka um fingurin á læknanum? „Tá fór Clancy frá at vera fyri fríari fosturtøku til at vera ímóti. Hann segði: 'Eg var fullkomiliga skelkaður í tveir tímar eftir skurðviðgerðina... nú veit eg, at fosturtøka er skeiv – tað er fullkomiliga skeivt.'“[41]

Trýr nakar veruliga, at hesin sjúklingurin, ið kann kenna pínu og taka um ein fingur, bert er eitthvørt lítið darl, sum hongur uppi í mammu síni? Kann nøkur haldgóð grundgeving gevast fyri, at so skjótt barnið verður lagt inn aftur í mammuna, kann tað til eina og hvørja tíð fram til føðing lógliga verða dripið?

**Allastaðni eru andsagnir**

Á Medical University of South Carolina kann ein barnakona verða handtikin fyri at geva ómyndigum fólki rúsevni, um urinkanningin gevur ábendingar um kokainnýtslu. Somuleiðis er í Illinois, har ein barnakona kann verða ákærd fyri „at geva ómyndigum fólki ólóglig rúsandi evni“, um tað verður staðfest, at hon hevur tikið hesi evni. Hetta er ein týðilig viðurkenning av, at tað ófødda barnið er ein persónur við rættindum og hevur krav um verju – eisini frá mammuni.

Men tó stendur somu kvinnu, ið er ákærd og fongslað fyri at koma barni sínum í vanda, *frítt í boði at burturbeina sama barn við fosturtøku.*



Í dagsins Amerika er tað ólógligt at koma tínum ófødda barni í vanda, men fullkomiliga lógligt at drepa tað.

Øll skeinkistøð í Oregon skulu hava eitt skelti hangandi, ið greitt lýsir vandarnar hjá barnakonum, um tær drekka rúsdrekka. Eitt nú skal standa, at rúsdrekka kann skaða fostrið.

Um rúsdrekka skaðar ófødd børn, hvat ger fosturtøka so við tey?

Kongressin samtykti einmælt, at deyðarevsing av einari barnakonu skal útsetast til eftir føðing. Allir kongresslimirnir vistu – eisini teir, ið vóru fyri fríari fosturtøku – at ófødda barnið er ein persónur fyri seg, ið er ósekur í lógarbrotum mammunnar. Ongantíð varð biðið um, at avrættingin varð útsett orsakað av mandlum, hjarta ella nýrum mammunar.

Fleiri statir hava viðtikið fosturdrápslógir, ið siga, at talan er um manndráp fyri øll uttan mammuna, sum tilætlað beinir fyri einum óføddum barni – tó er mamman undantikin í hesum føri. Hesar lógir eru greið tekin um, at barnið er eitt menniskja. Í 2004 viðtók Kongressin „Unborn Victims of Violence Act,“ ið sigur, at ein og hvør, ið „tilætlað drepur ella roynir at drepa eitt óføtt barn... skal revsast... fyri tilætlað at drepa ella royna at drepa eitt menniskja.“[42]

Royn at hugsa um henda løgna dupultmoral. Um ein kvinna er á veg til klinikkina at fáa sína fosturtøku framda, men á vegnum verður álopin og fostrið dripið, verður brotsmaðurin ákærdur fyri manndráp. Men um hetta álop og fosturdráp ikki hendir á vegnum til klinikkina, fær læknin pening fyri á lógligan hátt at drepa *júst sama barnið* (og møguliga á ein enn ræðuligari hátt).

Hvønn mun ger tað fyri barnið, hvør tað er, ið drepur tað?

**Hetta kunnu vit læra av Louise Brown**

At vera inni í onkrum er ikki tað sama sum at vera partur av onkrum. (Ein bilur er ikki ein partur av einum bilhúsi, bert tí hann er settur har.) Louise Brown, fyrsta royndarglasbarnið, varð gitin, tá sáð og egg runnu saman í einum royndarglasi. Gjørdist hon partur av kroppinum hjá mammuni, tá hon varð staðsett í lívmóðurina? Neyvan meira enn tá hon helt til í royndarglasinum.

Mismunur eigur ikki at verða gjørdur á menniskjum vegna teirra tilhald. Føðingin fremur onga grundleggjandi broyting í barninum; tað er í grundini tað sama áðrenn og eftir føðing. Onki óvanligt fer fram, sum broytir náttúru barnsins, tá tað førkar seg 20 tummar innan úr mammuni og útum.



## *Kapittul 6*

# HVAT SIGA MYNDIRNAR OKKUM?

Trupulleikin hjá tí ófødda barninum hevur altíð verið, at ongin gluggi er inn til lívmóðurina. Lagna barnsins er í hondum teirra, ið ikki kunnu síggja tað. Men seinastu árini er stór broyting farin fram á hesum øki.

Í 2002 og 2003 høvdu ávikavist *Time* og *Newsweek* forsíðugreinar um nakrar sera hugtakandi ultraljóðsmyndir av óføddum børnum. [43] *Newsweek* skrivaði á forsíðuni: „Eigur eitt fostur at hava rættindi? Hvussu vísindini broyta kjakið.“ Allar grundgevingar hvørva sum døgg fyri sól, tá vit síggja ófødda barnið.

### Fyrimunir við ultraljóði

Rebekah Nancarrow rindaði 80 dollarar fyri eina ultraljóðskanning hjá Planned Parenthood, men slapp ikki at síggja úrslitið, „tí tað einans fer at gera tað verri fyri teg“. Ótrygg um støðuna fór hon til eina barnakonumiðstøð, har hon fekk ókeypis ultraljóð og slapp at síggja. Tá segði hon: „Hevði eg ikki fingið ultraljóðsmyndina, so hevði eg fingið fostrið tikið. Men ultraljóðsmyndin sannførdi meg 100% um, at hetta var eitt lív inni í mær, ikki bara ein ella annar vevnaður ella klumpur.“[44]

Thomas Glessner sigur: „Áðrenn ultraljóðstøknina var tað soleiðis, at av teimum barnakonum, ið umhugsaðu at fáa fostrið tikið, og komu til barnakonumiðstøðir til kanningar og ráðgeving, valdu umleið 20-30% at verða verandi við barn. Men nú, ið miðstøðirnar hava fingið ultraljóðstøknina, er talið komið upp á 80-90%.“[45]

Audrey Stout, sjúkrasystir, greiddi mær frá einari ultraljóðkanning, hon hevði gjørt. Hesa ávísu ferðina læt barnið „munnin upp og aftur, histaði, legði seg aftur á, eins og tað rembdi sær, og strekti síni smáu bein. Tað enntá hevði hendurnar fram, so mamman kundi telja fingrarnar. Mamman var sjónliga rørd av upplivingini.“

Tá Audrey var liðug við skanningina, spurdi hon mammuna, hvørjar ætlanir, hon hevði. „Hon svaraði: 'Eg vil hava mítt barn.' Eg spurdi

hana síðan, um skanningin hevði havt nakra ávirkan. Hon segði: 'Heilt avgjørt. Eg kom bara inn higar at fáa staðfest, um eg var við barn, so eg kundi fáa tað burturbeint – men nú vil eg hava barn mítt.'"[46]

Túsundavís av slíkum søgum eru komnar frá barnamiðstøðum, ið nú brúka ultraljóð. Fleiri heimasíður á alnetinum vísa fram ótrúligar ultraljóðsmyndir – summar vísa heilt klárar myndir av óføddum børnum, sum sova, smíla, geispa ella remba sær.[47]

Kortini er avnoktanin ómetaliga sterk. Tá eg vísti einum forsprákara fyri fríari fosturtøku eina mynd av einum átta vikum gomlum óføddum barni, spurdi hon meg: „Heldur tú veruliga, at tú fert at lumpa nakran við hesi følsku myndini?"

Eg segði við hana, at hon kundi hyggja í lærubøkurnar á Harvard University Medical School ella blaða í tíðarritinum, *Life*,[48] ella kanna bókina hjá Nilsson, *Eitt barn verður føtt*,[49] og síggja júst somu myndirnar. Men hon vildi ikki hoyra hetta. Hví? Tí í veruleikanum segði hon, at tað uttan iva var eitt barn, sum var á myndini, men av tí at hon ikki vildi trúgva, at ein fosturtøka drepur eitt barn, so mátti hon nokta fyri, at hetta var ein verulig mynd.

### Tað, leivdirnar siga

Filmurin „The Gift of Choice" heldur uppá, at tað ófødda hevur „møguleika fyri at gerast ein persónur í framtíðini". Men tað, sum eftir er eftir eina fosturtøku, eru smáir, men vælskaptir kropslutir – armar og bein, hendur og føtur, kroppur og høvd. Tær kropsligu leivdirnar geva ikki eina ábending um endan av einum møguligum lívi, men einum veruligum lívi. Um tú ikki vilt trúgva hesum, kanna so leivdirnar eftir eina fosturtøku.[50] Um tú ikki megnar at hyggja, so spyr teg sjálvan hví. Um hetta bert var vevnaður og ikki eitt sundurlimað barn, so hevði tað ikki verið so ringt at sæð – ella hevði tað?

Í handbókini *Abortion Practice* greiðir Dr. Warren Hern soleiðis frá: „Ein langur Moyo saksur kann verða neyðugur fyri at avhøvda og sundurlima fostrið."[51] Tað er neyðugt at hava eitt høvd, um tú skalt avhøvdast, og kropslimir, um tú skalt sundurlimast. Kjøtklumpar og eindir av vevnaði verða ikki avhøvdað og sundurlimað. Hvussu ber tað til, at fólk, sum



dáma væl at síggja blóðugar og drápiligar sjónvarpssendingar, kenna seg illa, tá tey síggja myndir frá fosturtøkum? Um slíkar myndir sigur feministurin Naomi Wolf:

Fyri fleiri, ið tala fyri fosturtøku, eru slíkar myndir andstyggilig propaganda. Fleiri okkara halda, at hesar ræðuligu myndir hoyra talsfólkunum fyri lívi til... at tær ímynda upphugsaða harðskapin, ið hevði, um hann fekk møguleikan, gjørt heim okkara til ein kúgandi og óunniligan stað. „Fólk sum vit" síggja slíkar myndir sum tað pornografiska tilfarið hjá rørsluni fyri lívi. Men verulig feminisma byggir á grundleggjandi sannleikar... Ógvusligar myndir av fosturtøkum virka frálíkt sum politiskt kjak hjá rørsluni fyri lívi; men myndirnar eru ikki kjak í sær sjálvum; tær eru lívfrøðiligir veruleikar. Tað vita vit."[52]

### Rætturin at verða verandi óvitandi

Tá eitt valevni, sum er ímóti fosturtøku, nýtti myndir av tiknum fostrum í sjónvarpslýsingum, vóru fólk í øðini. Eitt tíðindafólk hjá *CBS Evening News* segði, at nú var fosturtøkukjakið sokkið so djúpt sum ongantíð áður. Løgið er tað, men ongin øsing stóðst av, at børn verða myrd, men bara av, at onkur hevði dirvi at vísa, at tey verða myrd.

Spurningurin, vit áttu at sett, er ikki: „Hví vísa talsfólk fyri lívi hesar myndir," men „hví vil nakar verja tað, sum kemur fram á hesum myndum?" Tað snýr seg ikki um, at myndirnar av óføddu børnunum eru blóðugar, men at tær vísa veruleikan, sum rørslan fyri lívi umboðar.

Ultraljóð og innvortismyndir eru ikki andstyggiligar, men vakrar og hugtakandi. Íðan, fagna talsfólk fyri fríari fosturtøku ikki hesum myndum? Nei. Felagsskapir, ið berjast fyri rættinum til fría fosturtøku, hava enntá víst á ultraljóðsmyndir sum „vápn" í hondunum hjá teimum, sum eru ímóti fosturtøku.[53] Nú bjóða klinikkir og fyritøkur eisini Real-Time 3D (viðhvørt eisini nevnt 4D) ultraljóðsmyndir av óføddum børnum, sum smíla, njósa og geispa. Í einum kjaki á PBS segði eitt pallborðsfólk, at slíkar myndir gera, at „tú fært eitt ósunt tilknýti til barnið".[54] Legg merki til orðavalið: „Barnið." Ultraljóðstøknin pilkar sundur ta aldargomlu grundgevingina fyri fosturtøku: „Tað er ikki eitt barn." Fólk siga nú: „Hvat tosar tú um? Sjálvandi er tað eitt barn – *hygg* bara!"

**At vinna á avnoktanini**

Holocaust var so andstyggiligt, at orð einans ikki megnaðu at lýsa ræðuleikarnar. Í langa tíð høvdu frágreiðingar um týningarlegurnar verið prentaðar í amerikonskum bløðum, men ikki fyrr enn hesi bløð byrjaðu at prenta myndir av dripnum fólkum, vaknaði tað amerikanska fólkið. Um tað ikki var fyri myndirnar, høvdu flestu okkara enn í dag ikki trúð ella skilt Holocaust.

Eg vitjaði ein hægri skúla, har ein bólkur fyri lívi hevði hongt upp eina myndarøð av børnum, tikin við fosturtøku, við síðuna av myndum úr týningarlegunum hjá nasistunum, av vígvøllunum, úr amerikonsku trælasøguni og øðrum søguligum ræðuleikum. Skelti við ávaringum um møguliga stoytandi myndir vórðu hongd upp, so øll, ið hugdu, høvdu sjálvi valt at hugt. Eg sá ta djúpu kensluligu ávirkanina, hesar myndir høvdu á bæði nemingar og lærarar, eisini á tey, ið ikki vildu trúgva tí, tey sóu.

Talsfólk fyri djórarættindum siga, at fyri at tala sína søk mugu tey vísa ræðuligar myndir, har eitt nú nósar verða bukaðir til deyðis við keppi. Um tað er góðtikið at síggja slíkar myndir, eiga vit so ikki eisini at síggja myndir av fosturtøkum? Og um fosturtøkur ikki drepa børn... hví eru hesar myndir tá stoytandi?

Var loysnin til Holocaust at banna teimum ræðuliga myndunum? Ella var loysnin at steðga drápunum?

Er loysnin til fosturtøku at sleppa av við myndir av deyðum børnum? Ella er tað at sleppa av við tað, sum drepur hesi børn?



*Kapittul 7*

# HVAT GEVUR EINUM MANNALÍVI „TÝDNING“?

Dr. William Harrison, talsmaður ímóti fosturtøku, sigur: „Fosturtøkukjakið í dag snýr seg ikki um, nær lívið byrjar, men um tað er eitt moralskt týdningarmikið lív.“[55] Men hvør ger av, hvørji lív hava týdning og hvørji ikki? Svarið er sum altíð, at tað eru tey valdsmiklu, ið gera av, hvørt tey veiku hava týdningarmikið lív ella ikki.

**Dupultmoralur**

Peter Singer, professari í etikki á Princeton, skrivar: „Lívið hjá einum fostri hevur ikki størri virði enn lívið hjá einum djóri, ið er á sama støði í skynsemi, tilvitan, vitan, kenslum o.ø.“[56] (Foreldur, ið gjalda fyri, at børn teirra kunnu koma til undirvísing hjá Singer, áttu kanska at spurt seg sjálvi, um Singer soleiðis eisini moralskt rættvísger dráp av teimum eldru.) Jim Newhall, ið fremur fosturtøkur, segði: „Ikki øll eru ætlað at verða fødd. Eg trúgvi, at lívið hjá einum barni byrjar, tá mamman vil hava tað.“[57] Merkir tað so, at eitt mannalív gerst veruligt, bara tá og um eitt annað menniskja virðir tað?

Í niðurstøðuni í rættarmálinum *Roe móti Wade* í 1973 setti hægstirættur spurning við, um tey óføddu høvdu „týdningarmikil“ lív. Men týdningarmikið *fyri hvønn*? Munnu ikki øll menniskju meta lív sítt í móðurlívi vera týdningarmikið, av tí at tey ikki høvdu verið til nú, um tey ikki vóru til tá?

Hvít gjørdu av, at svørt vóru minni menniskju. Menn gjørdu av, at kvinnur høvdu færri rættindi. Nasistarnir gjørdu av, at lív jødanna vóru týdningarleys. Nú hava stór fólk gjørt av, at smá fólk ikki hava nóg stóran týdning til at hava rættindi.

Persónleiki er ikki nakað, sum Ivy League professarar kunnu leggja í menniskju í síni ætlan um at rudda samfelagið fyri „óynskt“ menniskju. Persónleiki hevur eitt arvað virði, ið kemur av at vera partur av mannaættini. Sambært Bíbliuni er hetta at vera skaptur í Guds mynd.

**Tað, ið vísindini siga um „týdning"**

Hvat ger eitt lív týdningarmikið? Tað er ein vísindalig sannroynd, at ófødd børn hava eitt virkið tankavirksemi. *The Associated Press* kunngjørdi eina gransking, ið vísti, at „børn læra um sítt komandi móðurmál, áðrenn tey eru fødd". Gransking vísir, at „fostur uppfataðu, lurtaðu og lærdu nakað um amerikonsk-ensku ljóðmyndina"[58], meðan tey enn vóru í móðurlívi.

*Newsweek* staðfestir, at „lív í lívmóðurini umboðar tað næsta stóra granskingarøkið innan menning menniskjans, og tær fyrstu kanningarnar hava ... havt við sær ómetaliga týdningarmiklar uppdagingar."[59] Greinin sigur: „Uttan at gera ov nógv av, so kann fostrið av røttum sigast at vera eitt undurverk av fatan, tilvitan og sjálvstilvitan." Greinin sigur eisini, at vísindafólk longu hava staðfest sjálvstilvitan í øðrum triðingi av viðgongutíðini.[60] Vísindaligar kanningar gjøgnum fleiri ár hava gjølliga lýst ómetaligu eginleikarnar hjá óføddum børnum.[61]

Í fjórða mánaði verjir ófødda barnið eyguni móti sterkum ljósi, ið kemur inn í kroppin hjá mammuni. „Fostrið reagerar eisini upp á ljóð við so høgum ella lágum frekvensi, ið vaksin ikki megna at hoyra."[62] Tað hoyrir harðan tónleik og heldur fyri oyruni, tá nógvur gangur kemur uttanífrá. 17 viku gamalt upplivir fostrið REM (rapid eye movement) svøvn, sum bendir á, at fostrið ikki bara svevur, men droymir.[63] Kunnu vit siga, at ein, sum er førur fyri at droyma, ikki er førur fyri at hugsa?

Fosturtøkur, framdar eftir hetta tíðarskeið, drepa sjálvstilvitað og hugsandi menniskju. Móti endanum av øðrum triðingi av viðgongutíðini „er nervaringrásin í heilanum líka framkomin sum hjá einum nýføðingi." [64] Tað tykist óhugsandi, at nakar, ið er vitandi um hesi viðurskifti, kann verja núverandi lóg um fosturtøku í øðrum og triðja triðingi av viðgongutíðini. Men tó standa talsfólk fyri fríari fosturtøku óvikandi og verja slíkar fosturtøkur.

Men eru fosturtøkur, framdar fyrr, nakað betri enn tær, sum verða framdar seinni? Sjálvt í teimum førum, har evnafrøðiligar fosturtøkur verða framdar, áðrenn rúm er fyri hugsan, er deyðin júst eins veruligur og týdningarmikil. Eitt barn, ið hevði havt eitt navn, eina familju og eitt lív, fer nú ikki at fáa nakað av hesum.



**Klovnaður etikkur**

Singer sigur: „Um vit samanbera ein nýføðing, ið hevur álvarslig brek, við eitt ikki-menniskjaligt djór, sum eitt nú ein hund ella svín, so síggja vit, at ikki-menniskjað oftast er betri stillað, bæði veruliga og møguliga orsakað av skynsemi, sjálvstilvitan, samskifti og øllum øðrum, ið hevur við moralsk viðurskifti at gera."[65]

Singer skjýtur upp, at virðið hjá tí einstaka menniskjanum er grundað á tess nyttu fyri onnur: „Um deyðin hjá einum nýføðingi, ið ber brek, fer at hava við sær føðingina av einum øðrum nýføðingi við betri útlitum til eitt gott lív, so fer heildargóðskan at vera betri, um nýføðingurin við breki verður dripin. Missurin av góða lívinum hjá tí fyrra nýføðinginum vigar minni enn vinningurin av tí enn betra lívinum hjá tí seinna. Um drápið av nýføðinginum við bløðarasjúku ongi skaðilig árin hevur á onnur, so hevði tað – í heildarmyndini – verið rætt at dripið hann."[66]

Tá Singer kom at undirvísa á Princeton, vórðu mótmælisgongur fyriskipaðar av *Not Dead Yet*, t.e. ein bólkur, ið verjir rættindini hjá fólkum, ið bera brek. Tey kendu seg vanvird av bókum hansara, ið siga, at tað átti at verið lógligt at dripið nýføðingar, ið bera brek, eins væl og børn og vaksin við álvarsomum fatanarligum brekum.

Frítt val skynsemið byrjaði við fosturtøku, men tað er ikki steðgað har. Tá ið tað verður góðtikið at drepa ófødd børn, kann ongin veikur kenna seg tryggan. Hevur tann, ið ber brek eitt týdningarmikið lív? Hvussu við teimum gomlu? Um tey, sum ikki kunnu hugsa, ikki hava uppiborið at liva, hvussu er so við teimum, ið hugsa skeivt? Dr. Charles Hartshorne á University of Texas endurtekur etikkin hjá Singer: „Sjálvandi er ein nýføðingur ikki eitt heilt menniskja... Eg havi lítla samkenslu við tankan um, at barnamorð er tað sama sum eitt og hvørt annað morð. Persónar, ið longu eru virkisførir persónar í fullari merking, hava meiri týðandi rættindi enn sjálvt nýføðingar."[67]

**Er nakar tryggur?**

David Boonin sigur, at fosturtøka er „moralskt lastandi", men kortini „moralskt loyvd". Hon er loyvd, sigur hann, tí fosturtøka kann møguliga framleiða eina „almenna heildargleði".[68] Eins og Singer sær Boonin ikki

sannroyndina í, at sama persónliga kenslan av gleði (mátað í hugna og ikki at vera strongd ella vera í fíggjarligari trongstøðu) kann verða rokkin við at beina fyri øðrum eisini, ikki bara teimum óføddu. Tá eitthvørt verður mett at vera moralskt loyvt, tí tað kann vísa seg at framleiða gleði, tá er onki skikkað.

Krógvað undir nógvum av kjakinum um, hvat ger eitt lív týdningarmikið, er nyttumoralur. Eru fólk við sálarligum og likamligum breki ella óheppin fólk gagnlig fyri tey frísku og valdsmiklu, ella eru tey ein byrða?

Ein feministiskur bólkur vísir á, at um ófødd børn ikki eru trygg, so er ongin tryggur: Um vit taka onkran livandi lim av slagnum Homo Sapiens og seta hann har, ið vernd og lóg ikki røkkur, máa vit støðið undan málinum móti mismuni fyri øll onnur við. Grundarlagið fyri javnbjóðis viðgerð undir lógini er, at tað, at tú ert limur í Homo Sapiens, er nóg mikið til, at tú ert partur av mannasamfelagnum, uttan mun til ættbólk, kyn, avlamni, aldur, bústað ella ogn.[69]

Fosturtøka hevur ført okkum á vandamikla kós. Vit kunnu rakna við og førka okkum burtur av hesi hallandi hálkubreytini. Ella kunnu vit bara fylgja við, heilt til málið, sum ikki kann verða øðrvísi – eitt samfelag, har tey valdsmiklu til egnan fyrimun gera av, hvørji menniskju skulu liva, og hvørji skulu doyggja.

Dr. Leon Kass, lívfrøðingur á University of Chicago, sigur í sambandi við kósina hjá nútímans vísindum og heilivági: „Vit síggja longu útholanina av tankanum um menniskjað sum nakað framúr og guddómligt, sum ein vera við frælsi og tign. Og sjálvandi, um vit fara at síggja okkum sjálvi sum kjøt, so gerast vit kjøt.“[70]

Hetta er heimurin, sum verður myndaður av tungusnildinum hjá rørsluni fyri fríari fosturtøku. Er hetta heimurin, sum tú vilt hava børn og barnabørn tíni at vaksa upp í?

3. partur

# Kvinnan

## *Kapittul 8*

# SNÝR FOSTURTØKA SEG VERULIGA UM KVINNURÆTTINDI?

Kate Michelman, fyrrverandi forstjóri á NARAL, sigur: „Vit mugu minna fólk á, at fosturtøka er trygdin fyri rættindunum hjá einari kvinnu ... at taka fullan lut í tí sosiala og politiska lívinum í samfelagnum.“[71] Men ein barnakona *kann* taka fullan lut í samfelagnum. Um hon ikki kann, er so loysnin ikki at broyta samfelagið heldur enn at drepa børn?

„Hvussu kunnu kvinnur hava javnrættindi uttan at hava ræði á sínum nøringarviðurskiftum?“ *Feminists for Life* svara soleiðis aftur:

Fortreytin fyri hesum spurningi er fortreytirnar, at heimurin hevur verið stýrdur av mannfólki í áratúsund – at náttúran hevur lagað tað soleiðis til, at maðurin kom at ráða yvir kvinnuni. Læknavísindalig tøkni verður nú bjóðað sum ein loysn at fáa líkarættindi; men fortreytirnar eru skeivar... Er tað ikki ein háðan móti kvinnuni at siga, at kvinnur mugu broyta sína lívfrøðiligu skipan fyri at hóska til okkara samfelag?[72]

Í ritgerðini „Feminism: Bewitched by Abortion“ sigur Rosemary Bottcher, at feministiska rørslan hevur vanvirt kvinnurnar við at lýsa tær ikki at vera førar fyri at klára tað trýst og strongd, ið viðgongutíðin hevur við sær, uttan at tær meta drápið av sínum børnum sum ein útveg.[73]

Bólkar fyri vali stríðast áhaldandi fyri, at fosturtøka verður viðfarin eins og allar aðrar skurðviðgerðir, tá tað ræður um at upplýsa og kunna sjúklingin um viðgerðina og vansarnar. Tað tykist sum um, at tey halda, at kvinnur ikki eru førar fyri at taka skilagóðar avgerðir, eftir at tær eru komnar at kenna veruliga innihaldið.

Serrin Foster, leiðari í *Feminists for Life*, sigur tað so væl í „The Feminists Case Against Abortion“. Hon sigur, at søguliga vóru kvinnur fyrstu stuðulsfólk ímóti fosturtøku, og so løgið, tað ljóðar, „vórðu



lógirnar ímóti føsturtøku, sum teir fyrstu feministarnir arbeiddu so hart fyri at fáa settar í gildi, knústar av niðurstøðuni í málinum *Roe móti Wade* 100 ár seinni.“[74]

**Feministasøga**

Susan B. Anthony stóð fyri kvinnurættindum í eini tíð, tá kvinnur enntá ikki høvdu valrætt. Hon vísti á fosturtøku sum „barnamorð“ og metti tað sum eitt amboð til at halda bæði kvinnum og børnum niðri. Anthony skrivaði: „Eg taki frástøðu frá hesi ræðuligu brotsgerðini at drepa børn... Sama hvør orsøkin er, leysur kærleiki ella ynski um at bjarga óseka, ófødda barninum frá líðing, so er tann kvinna, ið fremur slíka gerð, ósvitaliga sek.“[75]

Blaðið hjá Anthony, *The Revolution*, hevði hetta uppáhald: „Tá ein kvinna oyðileggur lívið hjá sínum ófødda barni, er tað eitt tekin um, at hon í kunnan ella umstøðum hevur verið fyri stórum órætti.“[76]

Anthony og aðrir feministar, ið vóru ímóti fosturtøku, vórðu eftirfylgd áratíggju seinni av einum nýggjum feministiskum ættarliði. Mest eyðsýnilig var Margaret Sanger, ið gekk á odda í at umrøða fosturtøkuna sum eitt amboð fyri ættarrøkt, búskapi og kynsligum frælsi. Eftir at ættarrøkt fall í ónáð eftir Holocaust, tagnaði hennara felagsskapur burtur fyri seinni at koma fram aftur sum Planned Parenthood Federation.[77] Sanger og onnur, ið fylgdu Anthony, royndu at knýta fosturtøkuspurningin at lógarspurningunum viðvíkjandi kvinnurættindum.

Dr. Bernard Nathanson sigur, at í 1960 árunum knýttu hann og hansara samsintu strategar fyri fríari fosturtøku tilvitað fosturtøkuna at spurningunum um kvinnurættindi, soleiðis at rætturin til fosturtøku gjørdist partur av kvinnurættindunum og sostatt stóð sterkari.[78] Fosturtøkan hekk soleiðis uppi í skjúrtuvelinum á kvinnurættindum.

Alice Paul setti saman tað upprunaliga lógarískoytið um javnrættindi (Equal Rights Amendment). Men Alice Paul vísti á fosturtøku sum „ta ringastu misnýtsluna av kvinnum.“[79]

Ein feministur hevur stemplað royndina at knýta kvinnurættindi og fosturtøku saman sum „yvirgangsfeminisma.“ Við hennara orðum noyðir hetta feministin at vera „villiga at drepa fyri ta søk, hon trýr á“.[80] Í síni

blaðútgávu, *The American Feminist*, vísa *Feminists for Life* eina vakra andlitsmynd av einum barni og spyrja: „Er hetta fíggindi okkara?" Tey siga seg umboða eina 200 ára langa feministiska søgu ímóti fosturtøku, og at tað ikki var fyrr enn í 1970 árunum, at kvinnurørslan tók fosturtøkuna til sín.[81]

Spurnakanningar vísa, at tað eru fleiri kvinnur enn menn, ið staðfesta rættindini hjá teimum óføddu og taka undir við teimum.[82] Í roynd og veru er „størsti bólkurin, sum er fyri fríari fosturtøku í USA (og øðrum londum við) hvítir menn í aldrinum 20-45 ár".[83] Men „tann bólkurin, ið mest áhaldandi stuðlar fría fosturtøku, er í veruleikanum stakir menn".[84] Tað er løgið, at fosturtøka hevur verið gjørd til eitt kvinnurættindamál, tá hon hevur eggjað til mannligt ábyrgdarloysi og vantandi umsorgan fyri kvinnum og børnum. Áttu menn ikki at verðið bidnir um meir enn bert pening til at drepa eitt barn? Áttu teir ikki heldur at verðið eggjaðir til at siga við ta kvinnu, teir hava gjørt við barn: „Eg verði her, tá okkara barn hevur brúk fyri mær. Eg vil gera alt fyri tað. Og um tú vilt hava meg, skal eg eisini vera her, tá tú hevur brúk fyri mær."

**Kynsval**

Løgið er tað, at feminisma í sínum stríði fyri fosturtøku hevur stuðlað og tikið undir við tí besta háttinum at taka frá kvinnum teirra mest grundleggjandi rættindini – rættin til lív. Kring allan heim er fosturtøka vorðin høvuðsamboð at beina burtur óynsktar gentur. Ein kanning í fleiri bygdum í India vístu nøkur ræðandi hagtøl: Av einum íbúgvaratali á 10.000 vóru einans 50 gentur.[85] Allar hinar genturnar í túsundatali vóru dripnar við fosturtøku.

Í Bombay vísir ein kanning, at av 8.000 fosturvatnsroyndum, ið bendu á, at barnið var genta, vórðu allar genturnar uttan ein dripnar við fosturtøku.[86]

Orsakað av fosturtøku vegna kynsval eru tveir triðingar av børnunum, sum verða fødd í Kina, dreingir. Í bygdum er býtið tríggir fjórðingar dreingir og ein fjórðingur gentur.[87]



Fosturvatnsroyndir verða eisini brúktar í USA til at gera av kyn á barni. *Medical World News* kunngjørdi eina kanning, har 99 mammur fingu at vita kynið á sínum ófødda barni. 53 av hesum vóru dreingir, og 46 vóru gentur. Bert ein mamma valdi at beina fyri sínum dreingjabarni, 29 valdu at beina fyri sínum gentubørnum við fosturtøku.[88]

Fleiri gentur enn dreingir verða nú dripnar við fosturtøku. At drepa eina ófødda gentu er at drepa eina unga kvinnu. Talan kann ikki verða um javnrættindi fyri allar kvinnur, so leingi javnrættindi ikki eru galdandi fyri óføddar kvinnur.

*Kapittul 9*

# HAVA VIT RÆTT TIL AT VELJA, HVAT VIT GERA VIÐ OKKARA EGNA KROPP?

Talsfólk fyri fríari fosturtøku siga: „Ein og hvør kvinna hevur rætt til at velja, hvat hon ger við sín egna kropp". Løgið er tað, at hvørt ár í USA tryggja fosturtøkur, at í minsta lagi 650.000 kvinnur ikki sleppa at velja, hvat tær vilja gera við sín egna kropp. (Hetta talið er umleið helvtin av teimum børnum, ið verða burturbeind við fosturtøku – hin helvtin eru dreingjabørn.) Eitt gentubarn, ið verður dripið við fosturtøku, hevur ikki longur nakað lív, nakað val ella nakran kropp at ráða yvir.

Ein maður hevur ikki loyvi at nekta seg alment. Vit hava lógir ímóti skøkjulevnaði, narkotika o.ø. Flestu okkara taka undir við hesum lógum, hóast tær avmarka okkara frælsi at gera ávíst við okkara egna kropp. Hond mín er partur av mínum kroppi, men eg havi ikki loyvi til at sláa teg ella stjala frá tær ella sláa eitt barn.

**Rætturin at velja**

Tá eg havi hildið fyrilestrar á skúlum um sjónarmiðini fyri lívi, eri eg viðhvørt byrjaður við at siga: „Eg eri fyri fríum vali. Tí trúgvi eg, at ein og hvør maður hevur rætt til at neyðtaka kvinnur, um tað er hansara val. Tað er hóast alt hansara egni kroppur, og vit hava ikki rætt til at siga honum, hvat hann kann og ikki kann gera við hann."

Løtu eftir hvøkkin spyrji eg tey, hvat er galið við míni grundgeving. Tey vísa á, at sum eg havi hildið fast við rættin hjá manninum at velja, havi eg gloymt rættindini hjá kvinnum og tey árin, tað hevur við sær at verða neyðtikin. Tá sigi eg við tey: „Siga tit mær, at tit eru ímóti fríum vali? Er tað tað, tit siga?" Meðan tey kjakast, sigi eg við tey: „So tit siga, at um eg kann vísa tykkum, at eitt val hjá eini kvinnu at fáa fosturtøku skaðar ella drepur eitt annað menniskja, so vilja tit ikki longur vera fyri fríum vali í sambandi við fosturtøku?"



Mín vón er, at nakrar klokkur fara at ringja, og at tey fara at geva sínum vanliga viti og skili ans, ið er nakað, tey ikki hava gjørt í sambandi við fosturtøku.

Tað er burturvið at verja eitt ávíst val, ið er grundað á, at tað er eitt val. Rópini um „rættin at velja" síggja burtur frá tí sjálvsagda: *Ikki øll val eru loyvd*. Í roynd og veru eru nøkur val beinleiðis ónd – og tað kunnu bæði kristin og ikki-kristin verða samd um. Nøkur val eru góð, onnur ring. Tí kunnu vit ikki antin vera fyri fríum vali ella ímóti fríum vali. Heldur eiga vit at vera fyri tí góða og ímóti tí illa.

**Frítt val í summum førum**

Vit eru øll fyri fríum vali, tá tað snýr seg um, hvar fólk vilja búgva, hvønn bil tey vilja koyra, hvønn mat tey vilja eta, eins og tá tað kemur til mangt annað persónligt, ið teimum stendur frítt at velja eftir teirra egna smakki og tørvi. Vit eru eisini fyri fríum vali, tá hugsað verður um átrúnað, politikk og lívsstíl – eisini tá fólk velja trúgv og atburð, ið okkum ikki hóvar.

Men í nógvum førum eru vit ikki fyri fríum vali – íroknað um onkur hevur rætt at velja at søkja at tær, stjala frá tær, gera innbrot í tíni hús, stjala tín bil ella snýta teg á einhvønn hátt. Tað er sjálvsagt, at fólk hava *frælsi* til at gera hesi valini, men tað merkir ikki, at tey hava *rætt* til at gera tað.

Tá vit berjast ímóti „rættinum at velja" neyðtøku ella barnamisnýtslu, tá berjast vit ikki ímóti nøkrum, ið er rætt, men nøkrum, ið er skeivt. Og vit eru ikki trongskygd og treytaleys í hesum.

Onkursvegna hevur rørslan fyri „fría valinum", sum í veruleikanum er rørslan fyri fríari fosturtøku, megnað at lagt hald á orðið *val*. *Val* er eitt fagurheiti fyri fosturtøku, soleiðis at tá grundgivið verður ímóti fosturtøku, tá *tykist* tað sum um, at grundgivið verður ímóti vali. Vit, ið eru fyri lívi, mugu ikki kjakast ímóti vali – hetta er eitt stríð, ið ikki kann vinnast og ikki átti at verðið ført. Vit mugu loysa tær fastatøkur, ið fosturtøka hevur á valinum. Heldur eiga vit, tá vit hoyra onkran tosa um „frítt val", at spyrja og eggja øðrum at spyrja: *Hvat val tosa vit um?*

Tosa vit um fosturtøku, er spurningurin: *Heldur tú, at fólk eiga at hava rætt at velja at drepa børn*? Við at ganga ímóti fosturtøku ganga vit ikki ímóti vali sum heild; vit eru ímóti *einum ávísum vali* – barnamorði.

Hugsa um vanliga spurningin hjá teimum, ið eru fyri fríum vali: „Um tú ikki hevur álit á mær, at eg eri før fyri at velja, hvussu kanst tú so líta mær eitt barn til?" Hetta er ætlað at enda kjakið. Men gev gætur, hvussu *val* er skift út við *fosturtøku*. Tá vit so seta orð inn ístaðin, ið umboða veruleikan, tá verður spurningurin: „Um tú ikki lítur mær til at drepa eitt barn, hvussu kanst tú so líta mær til at uppala eitt barn?"

### Hvussu við valinum hjá ofrinum?

Ein kvinna vísir á: „Eftir at ein kvinna er vorðin við barn, kann hon ikki velja, um hon vil ella ikki vil verða mamma. Hon er longu mamma... tað einasta, hon nú kann gera av, er, um hon vil føða sítt barn deytt ella livandi."[89]

Trælaánarar vóru fyri fríum vali. Teir løgdu dent á holdsligar munir fyri at rættvísgera sína støðu yvir teimum trælbundnu. Teir søgdu: „Tær nýtist ikki at eiga trælir, men sig ikki, at vit ikki kunnu." Tey, ið vildu gera trælahald ólógligt, vórðu ákærd fyri at vera ímóti fríum vali og ímóti frælsi og fyri at trýsta sín egna moral oman yvir høvdið á øðrum.[90]

Allar misnýtandi og kúgandi rørslur – frá trælahaldi til skøkjuhald, frá rúsevnissølu til fosturtøku – hava hildið uppá, at tær eru fyri fríum vali. Somuleiðis hava tær ákært mótstøðurørslur, ið hava talað fyri samhuga og frígering, fyri at vera „ímóti fría valinum". Fólk, sum eru fyri vali vilja ikki síggja, at ofrini hava rætt til at velja. Tey svørtu valdu ikki trælahaldið. Jødarnir valdu ikki ovnarnar. Kvinnur velja ikki neyðtøku. Og børn velja ikki fosturtøku.



*Kapittul 10*

# ER FOSTURTØKA PARTUR AV RÆTTINUM TIL PRIVATLÍV?

„Fosturtøka kemur ikki øðrum við. Øll hava rætt til privatlív."

Mótsett vanligari hugsan sigur amerikanska grundlógin onki um ein rætt til privatlív. Harumframt er privatlív ongantíð ein avgjørdur rættur, men verður altíð stýrdur av øðrum rættindum.

Hvat høvdu vit hugsað um ein mann, ið vardi konubuking og barnamisnýtslu við at siga: „Hvat eg geri heima í mínum egna húsi, kemur ikki øðrum við"?

Onnur væl kend útsøgn: „Fosturtøka er ein privat avgerð hjá einari kvinnu í samráð við hennara lækna."

Læknar hava skil fyri læknavísindum, men teirra moralsku sjónarmið hava ikki sama myndugleika sum teirra læknafrøðiligu sjúkugreiningar (sum í sjálvum sær viðhvørt eisini eru ófullfíggjaðar). Nógvir læknar eru samvitskufull fólk, ið seta vælferð menniskjans yvir sjálvsøkni og pening. Tíverri finnast læknar, ið ikki eru moralskt álítandi vegleiðarar.

At læknar eru førir fyri at taka ómetaliga óndar avgerðir, prógvaðu nógvir týskir læknar undir seinna heimsbardaga. Robert Jay Lifton skjalprógvaði í máttmiklu bók síni *The Nazi Doctors*, hvussu gløggir læknavísindaligir serfrøðingar uttan kvøl tóku lut í miskunnarleysum og deyðiligum skurðviðgerðum og royndum á hjálparleys børn.[91] Hetta vóru teir allarbestu læknavísindaligu serfrøðingarnir í Evropa, men teir høvdu mist sínar moralsku kumpassir.

Læknar, ið fremja fosturtøkur, eru ikki meiri sakligir um fosturtøku, enn tubbaksfyritøkur eru um royking. Teirra persónligu og fíggjarligu áhugamál í fosturtøku og tað, at teir hava hert samvitsku sína, ger teir óskikkaðar at veita moralska vegleiðing.

**At koma sær undan snópisligum støðum**

Nógvar ungar kvinnur og foreldur teirra vilja helst sleppa undan at koma sær í snópisligar støður framman fyri atfinningarsomum áskoðarum.

Sama hvat vit hugsa um kynsligt samband uttan fyri hjúnaband, so er tað at vera við barn ikki skeivt, hóast orsøkin, tann kynsliga gerðin, var skeiv. Ongin eigur at døma mammuna sum eina „ljóta gentu" ella at kroysta hana til at „loysa trupulleikan" við at fáa fostrið tikið. Vit eiga at elska hana og hjálpa henni í viðgongutíðini og bjóða henni hjálp og ráðgeving í antin at uppala barnið ella at lata barnið til ættleiðingar. Sama hvat hon velur, so eiga vit at stuðla henni.

Hvørja ferð eg síggi eina ógifta kvinnu bera eitt barn, er mín fyrsta reaktión viðurkenning. Eg veit, at hon hevði kunnað valt „ta skjótu loysnina", uttan at nakar visti av, men hon valdi ístaðin at lata barn sítt liva.

Kynsligt samband áðrenn hjúnaband hevur álvarsamar avleiðingar, eisini tá talan er um annað enn óætlað at gerast við barn. Av hesi orsøk eiga vit tí eldhugað at stuðla undirvísing í fráhaldi.[92] Fráhald sigur nei til tað, ið skaðar teg, og í hesum sigur tað ja til tað lív, ið er best fyri teg. Men eftir at skaðin er hendur, kunnu vit læra av kynsligum sambandi áðrenn hjúnaband og ikki endurtaka tað. At drepa eina óseka menniskju við fosturtøku er meiri álvarsamt og meiri varandi. Tað fær ein persón at gjalda fyri feilin hjá einum øðrum. Har umframt kroystir fosturtøkan ta ungu kvinnuna at liva við støðugari skuldarkenslu og gevur henni eitt enn størri mistak at fjala út yvir. Fosturtøka kann fyribils fjala yvir ein trupulleika, men hon fer ongantíð at loysa hann.

Fosturtøka stuðlar hugburðinum, ið sigur: „Mín vælvera og lukka kemur fyrst – eisini um eg má síggja burtur frá rættindunum hjá einum øðrum ósekum menniskja at fáa tey." Hesin hugburður kemur til sjóndar allastaðni, og at enda fer hann at ríva niður ta moralsku verksmiðjuna í samfelagnum. (Og hann gevur aldri ta lukku, hann lovar.)

Órættvísu ella snópisligu umstøðurnar hjá einum persóni rættvísgera ikki gerðina at beina fyri einum øðrum persóni.



*Kapittul 11*

# SKAÐAR FOSTURTØKA KVINNUR LIKAMLIGA OG SÁLARLIGA?

„Fosturtøka er fullkomiliga miseydnað sum ein sosial skipan, ætlað at hjálpa kvinnum," sigur Serrin Foster, forkvinna í *Feminists for Life*. „Vit eru komin til ta niðurstøðu, at vit á henda hátt hava svikið kvinnur."[93]

Joan Appleton starvaðist sum yvirsjúkrasystir á einari fosturtøkuklinikk í Virginia, og hon var eisini talskvinna fyri fosturtøku á NOW. Hon spurdi seg sjálva, hví fosturtøka var „so sálarliga løstandi fyri eina kvinnu, og hví tað var ein so trupul avgerð at taka, tá tað var so natúrligt. Um tað var so rætt, hví var tað tá so trupult?"

Appleton segði við seg sjálva: „Eg ráðgav hesum kvinnum so væl, og tær kendu seg so tryggar við síni avgerð. Hví koma tær nú aftur – mánaðir og ár aftaná – sum sálarlig vrak?"[94]

Óteljandi kvinnur, ið eru skaddar av fosturtøku, hava sagt: „Eg hevði onga hóming av, at hetta kundi henda; ongin ávaraði meg um vandarnar."

**Vanligir trupulleikar**

Í frágreiðing síni til eina undirnevnd í senatinum í 2004 vísti Dr. Elizabeth Shadigan á, at „fosturtøka økir um vandarnar fyri bróstkrabba, placenta previa (sum er, at eftirburðurn liggur fyri og stongir fyri útgongdini), ov tíðliga føddum børnum, og at mamman ger av við seg... hagfrøðiliga eru allar deyðsorsøkir hægri hjá kvinnum, ið hava fingið fosturtøku."[95]

Í minsta lagi 49 kanningar hava víst ein munandi vøkstur av ov tíðliga føddum børnum ella ov smáum børnum hjá kvinnum, ið áður hava fingið fosturtøku. „Ov lág føðivekt og ov tíðliga fødd børn eru høvuðsorsøkirnar til nýføðingadeyða ella seinni brek, eins og tað eisini er høvuðsorsøk til vantandi fatanarligar førleikar og størri atferðartrupulleikar."[96]

Summar kvinnur kunnu ikki gerast við barn eftir fosturtøku. Møguleikin fyri vanskaptum børnum er størri hjá kvinnum, ið áður hava

fingið fosturtøku.[97] Deyðstíttleikin av nýføðingum hjá kvinnum, ið áður hava fingið fosturtøku, er 2-4 ferðir størri enn vanligt.[98] Orsakað av, at fosturtøka økir um vandan fyri, at børnini, ið verða fødd aftaná, verða fødd ófullborin, tykist tað at vera orsøkin til túsundtals heilaskaðar í Norðuramerika.[99]

Ektopiskar viðgongutíðir koma fyri, tá búningin fer fram uttan fyri lívmóðurina, vanliga í egggørnunum. Slíkar viðgongutíðir eru orsøk til 12% av øllum deyðstilburðum, tá ið mamman doyr, meðan hon gongur við barninum.[100] The U.S. Department of Health and Human Services í USA stóð fyri einari gransking, ið vardi 20 ár, av ektopiskum tilburðum, og sum vísti ein vøkstur upp á meira enn 500% av ektopiskum tilburðum, eftir at fosturtøka gjørdist lóglig.[101]

Kanningar vísa, at vandarnir fyri ektopiskum tilburðum eru tvær ferðir størri fyri kvinnur, ið áður hava fingið fosturtøku, og upp til fýra ferðir størri hjá kvinnum, ið hava fingið tvær ella fleiri fosturtøkur.[102] 40% av teimum kvinnum, ið hava eina ektopiska viðgongutíð, gerast ófruktbarar; og møguleikin fyri at koma út fyri enn einum ektopiskum tilburði gerst ein av trimum. „Bert 33% av ektopisku viðgongutíðunum hava við sær eitt livandi barn."[103]

CDC (The Centers for Disease Control) staðfestir, at „trupulleikar, tengdir at viðgongutíð, so sum ektopiskir tilburðir ... framvegis ávirka einar 2000 kvinnur hvønn dag."[104]

Undirlívsbruni hevur við sær fepur og ófruktbæri. Granskarar siga, at „undirlívsbruni er ein vanligur og álvarsamur fylgitrupulleiki av fosturtøku og vísir seg at gera seg galdandi í 30% av øllum fosturtøkum."[105] Ein kanning av kvinnum, ið høvdu fingið fosturtøku í fyrsta triðingi av viðgongutíðini, vísti, at „kvinnur, ið høvdu fingið undirlívsbruna eftir fosturtøku, vóru í munandi størri vanda fyri at ... kasta burtur, ófruktbæri, samlegupínu og kroniskari undirlívspínu."[106]

Placenta previa kemur av einari „lívmóður, sum er løstað framman-undan,"[107] – íroknað fosturtøku. Tað er 7-15 ferðir meira vanligt hjá kvinnum, ið áður hava fingið fosturtøku, enn hjá teimum, ið ikki hava.[108] Fráboðaðir trupulleikar, ið standast beint eftir og orsakað av fosturtøku, eru ikki minni enn 10%. Harafturat vísa granskingar av langtíðartrupulleikum og ofta fráboðaðum trupulleikum, ikki minni enn 17% og ofta heilt upp í 25-40%."[109]

Kvinnur, ið hava fingið eina fosturtøku, eru í dupult so stórum vanda fyri at fáa lívmóðurkrabba enn kvinnur, ið ikki hava fingið fosturtøku, og kvinnur við fleiri fosturtøkum á baki fleirfalda vandan fyri lívmóðurkrabba heilt upp í fimm ferðir. Líknandi vandar fyri krabba í eggjastokkunum og livrini verða eisini knýttir at fosturtøkum.[110]

Eftir drúgva gransking kom Dr. Joel Brind, professari í endokrinologi (læran um organini (kertlarnar), sum framleiða hormonir) á City University of New York, til hesa niðurstøðu: „Tað, ið minkar um vandan fyri bróstkrabba mest, er, at tú ikki fært fosturtøku."[111] Ein kvinna, ið fær eina fosturtøku, økir um vandan fyri bróstkrabba við í minsta lagi 50%um og heilt upp í 300%.[112]

**Vanligir sálarligir trupulleikar**

Óteljandi kanningar seta fosturtøku í samband við vaksandi kynsligt ónøgdsemi, andstygd fyri kynslívi, miss av inniligleika, óvæntaða skuld-arkenslu, kynsligt samband uttan fyri hjúnalag, strongdtilburðir, persón-leikaklovning,sorgarreaktión, barnamisnýtslu og -misrøkt og rúsdrekka- og rúsevnismisnýtslu.[113][114][115] Ein kanning á Elliot Institute bendir á, at kvinnur, ið fáa fostur tikið, eru í fimm ferðir so stórum vanda fyri at misnýta rúsevni.[116]

Serfrøðingurin í eftirfosturtøku, David Reardon, sigur: „Í eini kanning av eftirfosturtøkusjúklingum – bert átta vikur eftir, at tær høvdu fingið fosturtøku – komu granskarar fram til, at 44% gramdu seg um nervaólag, 36% gramdu seg um svøvnólag, 31% iðraðu seg um sína avgerð, og 11% høvdu fingið sálarsjúkuheilivág frá sínum egna lækna."[117] Hetta er serstakliga týdningarmikið, av tí at summar kvinnur ikki tykjast at hava havt nøkur týðilig árin av fosturtøkuni fyrr enn fleiri ár aftaná.

WEBA (Women Exploited by Abortion) hevur havt meir enn 30.000 limir í meira enn 200 deildum kring USA og deildum í Kanada, Týsklandi, Írlandi, Japan, Avstralia, Nýsælandi og Afrika.[118]

Upp í felagsskapir, sum hjálpa eftir fosturtøku, teljast eisini Victims of Choice, PACE (Postabortion Counseling and Education), HEART

(Helping and Educating in Abortion-Related Trauma), Healing Visions Network, CARE (Counseling for Abortion-Related Experiences), Women of Ramah, Project Rachel, Open Arms, Abortion Trauma Services, American Victims of Abortion og Former Women of Choice. At slíkir felagsskapir finnast, vitnar um veruleikan av sinnisligum og kensluligum sálarløstum hjá óteljandi kvinnum, ið hava fingið fosturtøku.

Eg las eina blaðgrein, ið segði fosturtøku bert vera eins og allar aðrar vanligar skurðviðgerðir, ikki øðrvísi enn ein rótviðgerð ella blindtarmsskurðviðgerð. Men hví minnast fólk ikki ársdagin fyri teirra blindtarmsskurðviðgerð 20 ár seinni? Hví gráta tey ikki óstýriliga og syrgja missin av sínum blindtarmi? Og hvar eru allir felagsskapirnir, ið stuðla og ráðgeva teimum, ið hava verið ígjøgnum eina rótviðgerð?

(Fleiri mannfólk fara eisini ígjøgnum tíðarskeið við sálarløstum orsakað av sínum leikluti í fosturtøkuavgerðum og missinum av børnum sínum.[119] Stuðlandi felagsskapir eru eisini fyri hesar menn.[120])

**Deyði orsakað av lógligum fosturtøkum**

Ein kanning av deyða í viðgongutíðini varð kunngjørd í *American Journal of Obstetrics and Gynecology*. Henda kanning vísti, at deyðstíttleikin í sambandi við fosturtøku er 2,95 ferðir hægri, enn um viðgongutíðarskeiðið verður fullført.[121]

Ein frágreiðing frá CDC kunngjørdi í 1998 tíggju deyðstilburðir í sambandi við fosturtøku.[122] Men sambært somu frágreiðing hava slík hagtøl avmarkað virði, tí ikki allir statir krevja frágreiðingar.

Og sjálvandi hava fosturtøkuklinikkir onki at vinna, men nógv at missa, við at kunngera frágreiðingar.[123] Tað, ið ger deyðstilburðir í sambandi við fosturtøku truplar at finna fram til, er, at høvuðsparturin av deyðstilburðunum henda ikki undir sjálvari skurðviðgerðini, men eftir. Tí verða vanliga aðrar týdningarleysar orsøkir gjørdar til deyðsorsøk: Hugsa um mammuna, ið bløddi, fekk blóð, fekk livrabruna og doyði ein mánað seinni. Almenn deyðsorsøk? Livrabruni. Verulig orsøk? Fosturtøka. Ein gjøgnumgatað lívmóðir hevur við sær svull í undirlívinum, sárbruna, blóðeitran og deyða. Almenna deyðsfrágreiðingin kann nevna



svull í undirlívinum og blóðeitran. Men fosturtøka verður ikki nevnd. Fosturtøka hevur við sær fylgisjúkur. Ár seinni fer hon undir eina ektopiska viðgongutíð og doyr. Almenn deyðsorsøk verður: Ektopisk viðgongutíð. Veruliga orsøkin? Fosturtøka.[124]

Ein kanning, ið varð kunngjørd í *Southern Medical Journal*, bendi á, at „kvinnur, ið fáa fostrið tikið, eru í munandi størri vanda fyri at doyggja enn kvinnur, ið føða".[125] Her er íroknað 154% størri vandi fyri at doyggja fyri egnari hond eins og størri vandi fyri at doyggja av óhappi og manndrápi.

*Women's Health After Abortion* er eitt víttfevnandi verk, ið fevnir um fimm hundrað læknafrøðiligar greinar úr ymsum tíðarritum, ið lýsa skaðiligu árinini, ið fosturtøka hevur á kvinnur.[126] Ein og hvør, ið enn ivast í, um fosturtøka hevur álvarsamar langtíðarløstir á kvinnur, átti at kannað hetta sannførandi próvtilfarið.

**Hetta siga kvinnur**

Spurnakanningar fyri kvinnur, ið hava upplivað trupulleikar eftir fosturtøku, vísa hetta:

- Meir enn 90% siga seg ikki at hava fingið nóg góða kunning til at kunna taka eina væl umhugsaða avgerð.
- Meir enn 80% siga tað vera sera óhugsandi, at tær høvdu fingið fostrið tikið, um tær ikki vóru eggjaðar til tað av øðrum, eisini sínum egnu fosturtøkuráðgevum.
- 83% siga, at tær høvdu gingið alla viðgongutíðina og føtt sítt barn, um tær høvdu fingið stuðul frá sínum dreingjum, familjum ella øðrum, ið høvdu týdning fyri tær.[127]

Allar kvinnur hava meir uppiborið enn eina fosturtøku.

*Kapittul 12*

# ER FOSTURTØKA RØTT, UM LÍV MAMMUNNAR ER HÓTT?

Er tað rætt at fremja fosturtøku, um viðgongutíðin ella føðingin hóttir lívið ella heilsuna hjá einari mammu?

Tað kemur sera sjáldan fyri, at fosturtøka er kravd fyri at bjarga einari barnakonu frá at doyggja. Dr. C. Everett Koop segði, meðan hann var landslækni, at hann sum barnaskurðlækni í 36 ár ongantíð er komin í eina støðu, har tað hevur verið neyðugt at beina fyri einum óføddum barni fyri at bjarga lívinum á mammuni. Hann segði, at tað at brúka hesa grundgevingina fyri at rættvísgera fosturtøku var ikki annað enn undanførsla. Dr. Landrum Shettles segði, at minni enn 1% av øllum fosturtøkum verða framdar við tí fyri eyga at bjarga lívinum á mammuni.[128]

**Bjarga tí lívi, ið bjargast kann**

Blóðeitran gevur barnakonu óheppin heilsuárin og stóran ampa, so at hon helst má liggja niðri størsta partin av viðgongutíð sínari. Hetta er trupult, men vanliga ikki lívshóttandi. Í slíkum førum fer fosturtøka orsakað av „heilsuni“ ikki at bjarga lívi, men at taka lív.

Men um mamman hevur lívmóðurkrabba, sum skjótt breiðir seg, og má skurðviðgerast fyri hetta, kann henda skurðviðgerð hava við sær, at barnið doyr. Í einari ektopiskari viðgongutíð mennist barnið uttan fyri lívmóðurina. Her hevur barnið ongan møguleika at koma undan og má helst takast fyri at bjarga mammuni. Hetta eru syrgiligar støður. Men hóast eitt lív má verða tikið, so má tað lív bjargast, ið bjargast kann. Oftast er tað lívið hjá mammuni. Tað er sjáldsamt, tá komið er nakað á leið í viðgongutíðini, at bert barnið kann bjargast og ikki mamman. Men tó: eitt bjargað lív er betri enn tvey mist.



Vinir okkara vóru komin í ta støðu, at mamman hevði fingið lívshóttandi krabba, sum skjótt spreiddist og mátti takast. Tað kundi hava við sær, at teirra ófødda barn fór at doyggja. Hon var tó ikki komin so langt til, at barnið var nóg búgvið til at kunna liva uttan fyri lívmóðurina. Skurðviðgerðin varð framd, men var hetta ikki á nakran hátt ein fosturtøka. Endamálið við skurðviðgerðini var ikki at drepa barnið, men at bjarga mammuni. Barnsins deyði var ein syrgilig avleiðing av at bjarga einum øðrum lívi. Hetta var framt í fullum samsvari við hugsjónina fyri lívi, av tí at tað at vera fyri lívi ikki einans merkir at vera fyri lívinum hjá børnum. Tað merkir eisini at vera fyri lívinum hjá kvinnum.

*Kapittul 13*

# ER RÆTT HJÁ KVINNU AT FÁA FOSTURTØKU, UM HON VERÐUR VIÐ BARN ORSAKAÐ AV NEYÐTØKU ELLA BLÓÐSKEMD?

Guttmacher Institute, ið stuðlar fosturtøku, gjørdi kanningar, ið bendu á, at tvey samtykkjandi fruktbør vaksin hava bert ein 3% møguleika fyri, at kvinnan gerst við barn undir eini samlegu. Kanningarnar bendu eisini á, at orsøkir eru, ið gera seg galdandi í sambandi við neyðtøku, ið minka um møguleikarnar upp aftur meira.[129] Stovnurin sigur, at 14.000[130] fosturtøkur verða framdar á hvørjum ári orsakað av neyðtøku. Tað er 1% av øllum fosturtøkum.[131] Aðrar kanningar vísa, at fosturtøkur orsakað av neyðtøku eru nógv sjáldsamari, helst ein av hvørjum túsund.[132] Harumframt verður sagt, at av tí at gitnaðurin ikki fer fram beint eftir samlegu, kunnu kvinnur verja seg ímóti at gerast við barn við at skola ella beina burtur sáðið, áðrenn eggið verður gitið. (Hetta er heilt øðrvísi enn at brúka evnafrøðilig evni til at burturbeina eitt frammanundan gitið barn.)

**Hvat snýr tað seg veruliga um?**

Hvar kemur hendan misskiljingin frá, at so nógvar kvinnur gerast við barn orsakað av neyðtøku? Óttafullar ungar barnakonur siga seg ofta hava verið neyðtiknar, av tí at tær so sleppa undan fordøming. Norma McCorvey, t.e. unga kvinnan, „Roe", í rættarmálinum *Roe móti Wade*, fekk stóra samkenslu bæði í rættarsalinum og frá fjølmiðlunum, tá hon segði seg hava verið neyðtikna. Men nøkur ár seinni viðgekk hon, at hon hevði logið og als ikki var neyðtikin.[133] (McCorvey er síðani vorðin eitt opinskárað talsfólk fyri lívi – og hevur eisini biðið Hægsta Rætt um at taka málið upp aftur og broyta dómin.)[134]



Talsfólk fyri fríari fosturtøku flyta áhugan frá tí stóra meirilutanum av fosturtøkum yvir á neyðtøku, tí neyðtøka fær eina væl uppi borna samkenslu. Tað, at tey áhaldandi vísa til neyðtøku, gevur ta skeivu fatan, at tað er vanligt, heldur enn sjáldsamt, at kvinnur gerast við barn orsakað av neyðtøku.

Vit hava eina góða vinkonu, ið varð neyðtikin og gjørdist við barn. Vegna umstøður hennara var frægast fyri hana ikki at uppala barnið. Hon gav tað burtur til ættleiðingar hjá einari kristnari familju. Vinkona okkara hevur tíðum samband við familjuna og barn sítt. Tað hevur ikki verið lætt, og hon hevur liðið nógv – tó fær hon eina ómetaliga troyst í vitanini um, at barn hennara er á lívi og verður elskað.

Í eini sjónvarpssending um fosturtøku hoyrdi eg ein mann siga um børn, ið eru úrslit av neyðtøku: „Onki av slíkari náttúru hevur nøkur rættindi, tí tað er eitt úrslit av neyðtøku." Men hvussu er náttúran í hesum barni øðrvísi enn hjá øðrum børnum? Eru summi børn meira verdig til lívið enn onnur, tí pápi teirra var eitt betri menniskja? Og hví er tað, at talsfólk fyri fosturtøku altíð siga, at tað er mamman, sum eigur tað ófødda barnið, ikki pápin, fyrr enn talan er um neyðtøku – hví er tað tá brádliga pápin, sum eigur barnið – ikki mamman?

Tað snýr seg ikki um, *hvussu* barnið verður gitið, men *at* tað verður gitið. Barnið er ikki eitt vanvirðisligt „úrslit av neyðtøku." Tað er einastandandi og Guds undurfullur skapningur.

At føða eitt barn og halda um eitt ósekt barn kann gera eini plágaðari kvinnu nógv meiri væl enn vitanin um, at eitt ósekt barn doyði í eini úrslitaleysari roynd at minka um hennara sálarløstir.

**Gitin undir blóðskemd**

Blóðskemd er ein ræðulig brotsgerð. Brotsfólkini áttu at verðið revsað, og týðandi átøk áttu at verðið gjørd til at fingið flutt gentuna burtur frá viðkomandi skyldfólki, ið hevur misnýtt hana kynsliga. Misnýtarin er trupulleikin – *ikki* gentan ella barn hennara. Loysnin er at leggja uppí, verja og veita misnýttu gentuni áhaldandi persónliga hjálp – ikki at drepa eitt ósekt barn. Hóast vanliga hildið er vanskapt fostur sjáldsamt í slíkum førum. Men ber barnið brek, hevur tað framvegis uppiborið at liva.

Hví skal A persónur drepast, um B persónur kynsliga misnýtir ella neyðtekur mammuna hjá A persóni? Um pápi tín fremur eina brotsgerð, skalt tú so inn at sita fyri hana? Um tú í dag fekst at vita, at biologiski pápi tín neyðtók mammu tína, hevði tú so hildið, at tú ikki longur hevði nakran rætt til at liva? Ein kvinna, ið hevði hoyrt meg tosa um hetta evnið, kom grátandi til mín eftir fyrilesturin. Hon segði: „Mamma mín varð neyðtikin sum 13 ára gomul. Hon fekk meg og gav meg burtur til ættleiðingar. Hvørja ferð eg hoyra onkran siga, at fosturtøku er í lagi í sambandi við neyðtøku, hugsi eg, at eg helst ikki havi nakran rætt til at liva."

Latið okkum revsa illgerðafólkini – ikki offrini. Kvinnan er ikki ein oyðilagdur lutur – hon er als ongin „lutur", men ein vøkur menniskja við virði og tign, sum enntá ljótasta gerð ikki kann taka frá henni. Somuleiðis er barnið ikki ein krabbavøkstur, ið má takast, men ein livandi menniskja.

### Fosturtøka styrkir sálarløstirnar av neyðtøku

Feminists for Life siga: „Nógvar kvinnur hava sagt seg líða av sálarløstum orsakað av fosturtøku langt eftir, at sálarløstirnir av neyðtøkuni eru fánað burtur."[135] Tað er trupult at ímynda sær eina verri viðgerð fyri ein kvinnu, ið er vorðin neyðtikin, enn ta skuldarkenslu og vónbrot, ið stendst av at fáa barn sítt dripið. Einaferð fer hon at skilja – og tey, ið ráða henni til fosturtøku, fara ikki at vera har at stuðla og hjálpa henni at bera hennara pínu og skuldarkenslu.

Í bók teirra *Victims and Victors* greiða David Reardon og hansara felagar frá søgunum hjá 192 kvinnum, ið gjørdust við barn orsakað av neyðtøku ella blóðskemd, og 55 børnum, ið eru úrslit av kynsligum ágangi. Tá slík offur sleppa at siga sína egnu hugsan, vísir tað seg, at teirra hugsan um fosturtøku er næstan einmælt – og beint øvut av tí, ið flestu høvdu spátt:

Næstan allar kvinnur, ið tosað varð við í sambandi við hesa bók, søgdu, at tær angraðu, at tær fingu beint fyri børnum sínum, ið vórðu gitin undir neyðtøku ella blóðskemd. Av teimum, ið søgdu sína hugsan, vóru oman fyri 90%, ið vildu ráða øðrum, ið gerast við barn í sambandi við kynsligan



ágang, frá at taka fostrið. Av teimum kvinnunum í bókini, ið gjørdust við barn undir neyðtøku ella blóðskemd og gingu alla viðgongutíðina, var ongin, ið segði seg angra sítt val.[136]

Tað er ein samanhangur ímillum harðskapin í neyðtøku og fosturtøku. Bæði verða framd av einum meira valdsmiklum persóni. Fosturtøka ber einum neyðtøkuofri ongan lekidóm. At lýsa deyðadóm yvir óseka barn illgerðamansins ger onki verri fyri neyðtøkumannin og onki betri fyri kvinnuna.

At skapa eitt offur aftrat fer ongantíð at bøta um skaðan á tí fyrra.

4. partur

# Onnur týdningarmikil evni

## *Kapittul 14*

# HVUSSU VIÐ BØRNUM, IÐ BERA BREK, OG BØRNUM, IÐ ERU ÓYNSKT?

Summi siga: „Tað er miskunnarleyst at lata eitt barn, ið ber brek, verða føtt til eitt ússaligt og meiningsleyst lív." Men hvat hugsa tey, ið bera brek, um sítt egna lív? Sjúklingar við mønulopi vórðu spurdir, um teirra brek gjørdi lívið meiningsleyst, og um teir áttu at sloppið at doyð eftir føðing. „Teirra einmælta aftursvar var sannførandi. Sjálvandi vildu teir liva! Í roynd og veru hildu teir spurningin vera tápuligan."[137]

Eg hoyrdi eitt fosturtøkutalsfólk siga um eitt barn við fjølbreki: „Eigur ein kvinna at vera noydd til at bera ein vanskapning í heim?" Bert við at brúka slík orð kunnu vit lumpa okkum sjálvi til at trúgva teimum. „Grønsak" er annað nógv brúkt heiti fyri fólk, ið eru mestsum hjálparleys. Slíkt málbrúk ger fólk ómenniskjalig í okkara oyrum, men tað broytir onki við, hvørji tey eru.

Eitt meltað súrepli er framvegis eitt súrepli. Ein blindur hundur er framvegis ein hundur. Ein kvinna, ið hevur demens, er framvegis ein kvinna. Eitt barn, ið ber brek, er framvegis eitt barn. Náttúra og virði menniskjans broytist ikki av einum breki.

Summir læknar ráða til at „steðga viðgongutíðini", um eitt par hevur eina arvafrøðiliga søgu, ið kann hava við sær vanda fyri, at barnið er ónormalt. Vanligu kanningarnar fyri møguligum lýtum verða gjørdar við fosturvatnskanningum. National Vital Statistics Report frá 2000 gjørdi vart við, at 28,9 kvinnur av hvørjum 1000 fingu trupulleikar av fosturvatnskanningum, ið merkir, at hesin vandatáttur er næstan 3 av hvørjum 100 kvinnum.[138] CDC (The Centers for Disease Control) metir, at fosturvatnskanningar, ið verða framdar tíðliga, hava við sær, at „millum 1 av hvørjum 400 og 1 av hvørjum 200 fostrum doyr". Kanningin vísti eisini eina tíggjufalding av krypilsfótum eftir tíðliga framdar fosturvatnskanningar.[139] Løgið er tað, at ein framferðarháttur, ið er ætlaður at staðfesta fosturlýti, í veruleikanum hevur við sær ein munandi vanda fyri at elva til brek.



Fosturvatnskanningar verða vanliga gjørdar fyri at staðfesta Down syndrom, soleiðis at foreldur kunnu fáa møguleikan at velja fosturtøku. Vandin fyri at kasta burtur orsakað av fosturvatnskanningini er mestsum líka stórur sum vandin fyri Down syndromi.[140]

**Sinnisklovningur samfelagsins**

Ein spurnakanning fyri barnalæknar og barnaskurðlæknar vísti, at fleiri enn tveir av trimum vildu ganga foreldranna ynski á møti um at nokta at geva einum barni við Down syndromi eina skurðviðgerð, ið kundi bjarga lívi tess. Øðrumegin tryggja vit teimum, ið bera brek, serligar parkeringsbásar og lyftir. Vit tosa blítt um børnini við mønulopi og Down syndromi, ið vit síggja á myndum og í miðlum. Vit stuðla paralympisku leikunum og eggja luttakarnar. Vit tosa um ta gleði og íblástur, tey geva okkum. Men tá vit so hoyra um eina kvinnu, ið gongur við júst einum slíkum barni, siga vit: „Drep tað!"

Vert er at geva gætur, at „tað ongantíð hevur verið ein felagsskapur við foreldrum at børnum, ið bera brek, sum hevur stuðlað fosturtøku".[141] Ímynda tær, at títt seks ára gamla barn verður blint og lammað. Barnið verður nú ein byrða. Tað verður kostnaðarmikið, tvørligt og sálarliga hart. Átti tú at tikið lívið av tí? Um tað varð viðtikið við lóg, at tað var lógligt at gera av við slík børn, hevði tú so gjørt tað?

Ikki?

Hví ikki?

Tú hevði ikki dripið títt barn, hóast tað ber brek, *tí tú kennir tað*. Men at drepa eitt óføtt barn, bert tí tú ikki hevur hildið tí í ørmum tínum og ikki kanst hoyra tað gráta, broytir ikki virði tess og minkar ikki um missin av tí. Gev tær sjálvum ein møguleika at koma at kenna barn títt. Tú *fert* at elska tað.

Hvussu við einum barni, ið ikki hevur ein fult mentan heila? Av tí at tað kortini ikki fer at komast undan, vísa læknar ofta foreldrum á fosturtøku og ráða teimum til at fáa fostrið tikið. Men tað er stórur munur á at vita, at eitt barn fer at doyggja og so beinleiðis at velja at drepa tað. Fleiri familjur hava havt ríkar upplivingar saman við einum barni við ómentum heila, hava navngivið tað, hildið tí at sær og knýtt bond við tað. Tá tað

so doyr, uppliva tey sunna sorg orsakað av, at barnið fekk ein natúrligan deyða. Hetta er beint øvut av ósunnu sorgini og skuldarkenslunum, ið koma av at nokta einum barni pláss tess í familjuni og taka lív tess.

Góðskan av einum samfelagi verður í stóran mun lýst við, hvussu tað fer við sínum veikastu. At lætta um byrðarnar hjá øðrum kann aldri rættvísgera, at tey óseku verða dripin. Tað er ongin loysn at volda einum persóni líðing fyri at sleppa undan at gera tað við ein annan. Um vit taka fostur orsakað av teirra brekum, so koma vit øllum fólkum, ið bera brek, í váða.

**Byrðan av at vera óynsktur**

Planned Parenthood sigur, at óynskt børn „fáa verri próvtøl, serliga í málsligu lærugreinunum". Sagt verður eisini, at tey sum ung „gerast verri og verri fyri innan skúlagátt", og at tað er „minni sannlíkt, at tey mennast samsvarandi vaksandi skúlaavbjóðingunum." Og „samanborið við ynskt børn er møguleikin minni enn 50% fyri, at óynskt stremba eftir hægri útbúgving".[142]

Eg seti ikki spurning við hesi úrslit. Tey greiða okkum frá tí, ið vit longu áttu at vitað – týdningin av at ynskja okkara børn. Ístaðin nýta talsfólk fyri fríari fosturtøku slíkar kanningar til at rættvísgera burturbeining av teimum „óynsktu". Tað eru fleiri, ið ikki ynskja at gerast við barn, men *tað er onki, ið eitur eitt óynskt barn*. Nøkur fólk eru, ið ikki ynskja tey, men tað eru fleiri, ið ynskja tey av heilum hjarta.

Næstan 1.300.000 amerikanskar familjur vilja ættleiða. Eftirspurningurin eftir børnum til ættleiðingar er so stórur, at ein svartur marknaður hevur ment seg, har børn verða seld fyri upp til 50.000 dollarar. Ikki bert „normal" børn eru eftirspurd; fleiri ynskja sær børnvið serligum tørvi, eisini børn við Down syndromi og mønulopi.[143]

Mong børn, ið mammur av fyrstan tíð ikki ynskja sær, verða nógv ynskt seinni í viðgongutíðini og enn meira eftir føðing. Óheppið er tað, at fleiri av teimum kvinnum, ið høvdu ynskt barnið í sætta mánaði í viðgongutíðini, hava longu beint fyri tí í triðja mánaði.

Eisini eru mong børn, ið eru ynskt og vælkomin við føðing, men *ikki* ynskt, tá tey seks vikur seinni liggja og gráta klokkan tvey um náttina.



Eiga foreldrini framvegis at sleppa at gera av, um barnið skal liva ella ikki? Um tað er rætt og lógligt fyri føðing, hví so ikki eftir?

Trupulleikin við óynsktum børnum er góð grundgeving fyri at vilja hava børn. Men tað er ein vánalig grundgeving fyri at drepa tey.

Eitt av mest misvísandi sjónarmiðunum í grundgevingunum fyri fríari fosturtøku er at fáa tað at sýnast sum um, at fosturtøka er best fyri tað ófødda barnið. Hetta er so høpisleyst, at tað hevði verið láturvert, um tað ikki hevði verið so syndarligt. Ein lítil persónur verður pilkaður sundur, lim fyri lim, til *hansara* egna besta? Á sama hátt søgdu trælaeigarar, at fyri nekararnar var trældómur tað besta. (Hvønn lumpa vit?)

Fólk siga: „Eg kann ikki fáa hetta barnið, tí eg havi ongan møguleika at geva tí eitt gott lív." Og hvat er teirra loysn uppá, at tey ikki eru før fyri at geva barninum eitt gott lív? At taka frá tí tað einasta lívið, tað hevur.

**Eitt og hvørt barn er eitt ynskt barn**

*Óynskt* lýsir ikki barnið, men hugburðin hjá summum vaksnum mótvegis barninum. Veruligi trupulleikin er ikki óynskt børn, men óynskjandi vaksin.

At „ynskja" er bert ein persónlig og broytilig kensla hjá einum persóni mótvegis einum øðrum. Tað „óynskta" barnið er ein veruligur persónur, uttan mun til hvørjar kenslur onnur hava mótvegis tí. Virðið í einari kvinnu varð einaferð mett av, um ein maður vildi hava hana ella ikki. Nú verður virðið í einum barni mett við støði í, um mamman vil hava tað ella ikki. Hesi eru bæði syndarligir órættir. Slagorðið hjá Planned Parenthood: „Eitt og hvørt barn eitt ynskt barn," er nakað, ið vit øll eiga at taka undir við. Men vit eru ósamd um, hvussu hesin setningurin eigur at enda. Hvussu heldur *tú*, at setningurin eigur at enda?

Eitt og hvørt barn eitt ynskt barn, so ... latið okkum tí geva børnunum eitt heim, har tey eru ynskt, og latið okkum læra at ynskja tey enn meira.

Eitt og hvørt barn eitt ynskt barn, so ... latið okkum tí eyðmerkja óynskt børn, áðrenn tey verða fødd, og síðan drepa tey við fosturtøku.

Øll eru samd um, at børn eiga at vera ynskt. Einasti spurningurin er hesin: Eiga vit at sleppa okkum av við tey *óynskjandi* ella *børnini*? Tá talan er um tey óføddu, høvdu sjónarmiðini fyri fosturtøkurættindum verið meira beinrakin við einum øðrum slagorði, ið ikki hóskar seg eins væl á einum klistrimerki: „Eitt og hvørt óynskt barn er eitt deytt barn."



*Kapittul 15*

# FYRIBYRGIR FOSTURTØKA BARNAMISNÝTSLU?

Ein hálvvaksin genta átti barn á einum motelli í Delaware. Hon og drongurin løgdu barnið livandi í ein plastposa og tveittu tað í eina ruskbingju.

Ein 17 ára gomul mamma, ið gekk í kvøldskúla, tveitti barn sítt í ánna, tí hon ikki megnaði at finna nakra barnagentu.

Søgur líkar hesum finnast í hópatali.

Í 1973, tá fosturtøka gjørdist lóglig, vóru árliga áleið 167.000 tilburðir av barnamisnýtslu í USA.[144] Sambært U.S. Department of Health and Human Services vóru áleið 903.000 børn offur fyri misnýtslu í 2001. Hetta er eitt tal, ið er meira enn fimm ferðir so stórt sum í 1973.[145]

Vøksturin av barnamisnýtslu er væl ógvusligari, tá hugsað verður um tær 45 milliónirnar av amerikonskum børnum, ið verða burturbeind við skurðfosturtøkum (umframt tað ókenda talið á lívum, ið verða burturbeind við evnafrøðiligari fosturtøku) – tey verða tó ikki roknað sum offur fyri barnamisnýtslu. Men fosturtøka er tann fyrsta barnamisnýtslan, og ongin onnur er meira deyðilig. Grundgevingin fyri, at fosturtøka forðar fyri barnamisnýtslu, hevur sama gildi sum grundgevingin fyri at drepa konur, tí tað forðar fyri konubuking. Deyð fólk kunnu ikki longur verða misnýtt. Men at forða fyri, at tey verða misnýtt, við at drepa tey er undarligt skynsemi.

Hví er barnamisnýtslan alsamt vaksin, síðan fosturtøka gjørdist lóglig? Tað er tí, at *fosturtøka hevur broytt okkara hugsan um børn*.

**Hetta vísa kanningar**

„At fáa fleiri óynskt børn elvir til størri barnamisnýtslu," siga talsfólk fyri fosturtøku. Men granskingin sigur nakað annað.

Edward Lenoski, professari á University of Southern California, stóð fyri einari umfatandi kanning av 674 misnýttum børnum. Har kom fram, at 91% av foreldrunum ynsktu sær børnini, ið tey høvdu misnýtt.[146]

Grundgevingarnar hjá fosturtøkutalsfólkum fyri, at tað eru tey óynsktu børnini, ið eru dømd til at verða misnýtt, tykjast kanska at vera skilagóðar, men mest umfatandi kanningin til dagin í dag vísir, at hetta ikki er so.

„Kanningar benda á, at tað oftast eru mammur, ið áður hava fingið fosturtøku, sum misnýta børn.“[147] Kanningarnar hjá Dr. Philip Ney benda á, at tað lutvíst er orsakað av teirri skuldarkenslu og tunglyndi, ið koma eftir eina fosturtøku, og sum forðar mammuni í at knýta seg til síni framtíðar børn.[148] Dr. Philip Ney staðfestir, at tað at fáa eitt fostur tikið minkar um natúrliga tamarhaldið, ið foreldur vanliga hava á sínum sinnalagi mótvegis smábørnum.[149]

Bæði mamma og pápi skúgva til viks sítt natúrliga innskot at hjálpa einum hjálparleysum barni, tá tey velja fosturtøku. At hava hildið hesum umsorganarkenslum niðri eina ferð kann hava við sær, at tað framyvir gerst alsamt verri at stýra eins sinnalagi mótvegis einum hjálparleysum vøggubarni, einum grátandi smábarni ella einum treiskum barnagarðsbarni.[150]

Hugburðurin, ið førir til fosturtøku, er júst tann sami, sum førir til barnamisnýtslu. Harumframt, um mamman ikki fær fostrið tikið, kann hon hyggja at sínum strævna trý ára gamla barni og hugsa: „Eg hevði rætt til at fingið teg tikið.“ Barnið skyldar henni alt; hon skyldar barninum onki. Hetta hevur við sær ein mótvilja í foreldrunun at ofra seg fyri børnini. Sjálvt um tað er ótilvitað, slepst ikki undan hesum skynseminum: Um tað var í lagi at drepa sama barnið áðrenn føðing, er tað sjálvandi í lagi at misnýta tað nú.

Av teimum 5.000 amerikonsku børnunum, ið verða dripin hvørt ár (fosturtøkur eru ikki íroknaðar), verða 95% dripin av sínum egnu foreldrum – øðrum ella báðum.[151] Tað er ein gjøgnumsúrgað fatan av, at børn eru ogn foreldranna. Vaksin halda, at tey hava sama rætt til at fara við sínum børnum, sum samfelagið loyvdi teimum, áðrenn børnini vóru fødd. Tá barnamisnýtsluhugburðurin fær fastatøkur á einum samfelagi, avmarkar tað seg ikki bert til ávísan aldursbólk. Um ófødd børn ikki eru trygg, so eru ongi børn trygg.



Peter Singer sigur:

Ein greiður skilnaður vantar millum nýføðingin, sum í etiskt týðandi merking heilt greitt ikki er ein persónur, og so tað lítla barnið, ið er. Í bók okkara *Should the Baby Live?* skutu starvsfelagi mín, Helga Kuhse, og eg upp, at eitt tíðarskeið á 28 dagar eftir føðing kundi verðið loyvt, áðrenn ein nýføðingur verður góðtikin at hava somu rættindi sum onnur til lívið.[152]

Skulu børn fáa játtað rætt til lív 28 dagar eftir føðing? Hví ikki bíða seks mánaðir? Ella seks ár? At drepa eitt fimm, tíggju ella fimtan ára gamalt barn er í veruleikanum bara ein eftirbarnsburðar fosturtøka, er tað ikki tað? Eins og Singer hevur víst á, so er tað soleiðis, at tá tú einaferð hevur staðfest, at tað er í lagi at drepa ein persón, standa dyrnar sjálvsagt víðopnar fyri at drepa sama persónin í ymiskum aldri av ymiskum orsøkum.

Loysnin fyri illa viðfarin børn uttan fyri lívmóðurina er ikki illa viðfarin børn inni í lívmóðurini. Loysnin fyri misnýtt børn er ikki at misnýta tey eitt sindur fyrr. Loysnin er ikki at misnýta undir nøkrum umstøðum.

## *Kapittul 16*

# PERSÓNLIGA ÍMÓTI FOSTURTØKU, MEN TÓ FYRI FRÍUM VALI?

Mong siga: „Eg eri ikki fyri fosturtøku, men eg eri fyri fríum vali."

Men hvussu hevði tú svarað einum, ið segði: „Eg eri ikki fyri neyðtøku, men eg eri fyri fríum vali í sambandi við neyðtøku?" Tú ásannar, at sjónarmiðini hjá viðkomandi sipa til, at neyðtøka í veruleikanum ikki skaðar nakran, og at neyðtøka stundum kann rættvísgerast. Tú hevði svarað: „At vera fyri fríum vali í sambandi við neyðtøku *er* at vera fyri neyðtøku."

Á júst sama hátt er at vera fyri fríum vali í sambandi við fosturtøkur tað *sama* sum at vera fyri fríari fosturtøku.

„Ímóti fosturtøku? Ger tað ikki!" Í fyrsta eygnabragdi tykist hetta slagorðið at geva meining. Skynsemið hóskar væl í sambandi við at eta pitsu, sparka bólt og tílíkt, men ikki í sambandi við neyðtøku, píning, fólkarán og morð.

**Ein miðstøða?**

At vera persónliga ímóti fosturtøku og samstundis halda, at onnur hava rætt til at velja hana, meta fleiri sum eina rímiliga neyðsemju ímillum tað at vera fyri fosturtøku og tað at vera fyri lívi. Men tað er tað ikki. Fólk fyri fríum vali velja tað sama sum fólk fyri fosturtøku. Fyri barnið, ið doyr, hevur tað ongan týdning, um tey, ið ikki vildu verja tað, vóru fyri fosturtøku ella „einans" fyri fríum vali í sambandi við fosturtøku.

Einasta góða orsøkin til at vera ímóti fosturtøku er ein orsøk, ið noyðir okkum at vera ímóti, at onnur kunnu velja tað – tað er barnamorð. Persónliga at vera ímóti fosturtøku og samstundis vera fyri, at onnur eiga at hava rætt til fosturtøku, er ein sjálvsmótsøgn. Tað er júst sum at siga: „Persónliga eri eg ímóti barnamisnýtslu, men eg vil verja rættindi grannans til at misnýta sítt egna barn, um tað er tað, hann vil." Ella: „Persónliga eri eg ímóti trælahaldi, men um onnur vilja eiga trælir, so



kemur tað ikki mær við." Ella: „Persónliga eri eg ikki fyri konubuking, men eg vil ikki noyða míni egnu moralsku sjónarmið niður yvir onnur, tí eri eg fyri fríum vali í sambandi við konubuking."

Ein útvarpsvertur segði við meg, at hon tók sær tykni av, at summi fólk søgdu hana at vera „fyri fosturtøku" heldur enn „fyri fríum vali". Í hesi beinleiðis útvarpssending spurdi eg hana: „Hví vilt tú ikki vera roknað sum ein, ið er fyri fosturtøku? Er nakað galið við fosturtøku?" Hon svaraði: „At taka eitt fostur er hart. Tað er ikki soleiðis, at nakar veruliga ynskir tað." Eg segði: „Eg skilji ikki rættiliga. Hvat er tað, ið ger tað so hart? Hví skuldi nakar helst sloppið undan fosturtøku?" Hon segði nú, heldur ovurhugað: „Jú, sært tú, tað er hart at drepa sítt egna barn!"

Í somu løtu, hon segði tað, fangaði hon seg sjálva, men tá var longu ov seint. Í einari løtu av óumhugsni avdúkaði hon, hvat hon visti, hvat *øll* vita, um tey bert vilja viðganga tað: *At taka eitt fostur er skeivt, av somu orsøk er tað eisini hart* – tí tað er at drepa eitt barn.

Og tað finst ongin nóg góð orsøk til at drepa eitt barn.

## *Kapittul 17*

# HVUSSU VIÐ ÆTTLEIÐING?

Tað mest løgna við rørsluni fyri fríum vali er, at hon hevur fostrað tankan um, at kvinnur onki annað val hava enn fosturtøku. Rørslan fyri fríum vali kundi eins væl verið kallað rørslan fyri-ongum-øðrum-vali-enn-fosturtøku. Fleiri kvinnur greiða frá, at fyri tær merkti „frítt val" í veruleikanum „onki val".

Pápar, mammur, dreingir, menn, lærarar, skúlaráðgevar, læknar, sjúkrarøktarfrøðingar, fjølmiðlar, javnaldrar leggja mangan barnakonur undir sera stórt trýst og fáa tær at velja tað, ið teirra egna samvitska sigur er skeivt, og sum heldur er valið hjá øðrum enn teirra egna.
(Men hvar fara *tey* at vera, tá barnakonurnar raka við, hvat tað er, ið tær hava gjørt?)

Ynskja kvinnur veruliga fosturtøku? Fyrrverandi fyristøðukvinnan í Feminists for Life, Frederica Mathewes-Green, sigur: „Ongin ynskir sær fosturtøku á sama hátt sum ein kúluís ella ein Porsche. Tær ynskja fosturtøku á sama hátt sum eitt djór, ið er fangað í einari fellu og roynir at gnaga sítt egna bein av. Fosturtøka er ein syndarlig roynd at flýggja undan einari vónleysari støðu við oyðilegging og sjálvsmissi."[153]

Fosturtøka er meira ein síðsti útvegur enn eitt frítt val. Flestu kvinnur høvdu ikki valt at fingið fosturtøku, um tær vistu, at tær fingu ta umsorgan og tann fíggjarliga stuðul, teimum tørvar. Næstan tveir triðingar av teimum kvinnum, ið hava roynt fosturtøku, siga seg hava verið „noyddar til at fáa fosturtøku orsakað av sínum vánaligu umstøðum... meir enn 84% siga, at tær høvdu borið barnið í heim, um umstøður teirra vóru betri".[154]

### Valmøguleikin, ið sjáldan verður nevndur

The National Council for Adoption metir, at 1.300.000 pør bíða eftir at kunna ættleiða eitt barn.[155] Men hvørt ár, meðan 1.300.000 børn verða



dripin við fosturtøku, verða færri enn 50.000 børn latin til ættleiðingar. Tað merkir, at fyri hvørt nýtt ættleiðingarbarn verða 30 onnur dripin. Fyri hvørt par, ið sleppur at ættleiða, bíða fjøruti onnur.[156]

Í einum samfelag, ið virðir valmøguleikan, hví verður so ikki kravt av læknum, skúlum, familjuráðleggingarstovnum og fosturtøkuklinikkum, at tey skulu vísa kvinnum á *allar* valmøguleikarnar, ið eru, íroknað ættleiðing? Ein vinur okkara segði: „Tá eg var ráðgevi á eini fosturtøkuklinikk, var eg fullkomiliga óvitandi um aðrar valmøguleikar enn fosturtøku. Eg vísti ongantíð til møguleikan at ættleiða og ráddi ongantíð nøkrum til sjálvi at taka sær av barninum. Eg var púra óvitandi um læknavísindini og visti onki um fosturmenningina. Eg fekk onga veruliga upplæring – mítt starv var at tryggja, at kvinnurnar fullførdu fosturtøkutilgongdina."

Við slíkari „ráðgeving," hvussu nógvar kvinnur fara so at velja nakað annað enn júst fosturtøku? Fyrrverandi eigarar og starvsfólk á fosturtøkuklinikkum hava viðgingið, at tað var teirra starv at „selja fosturtøkur". Fleiri klinikkir fáa enntá fólk við útbúgving innan marknaðarføring at læra síni starvsfólk at marknaðarføra fosturtøku.[157]

Ættleiðing er ein jaligur valmøguleiki, ið tekur burtur uppalingarskylduna; samstundis bjargar ættleiðingin einum lívi og ger eina aðra familju lukkuliga. Tað er syndarligt, at ættleiðing so sjáldan verður vald... ella bjóðað fram sum ein annar valmøguleiki ístaðin fyri fosturtøku.

Kanningar á barnakonumiðstøðum benda á, at kenslulig mótstøða móti ættleiðing er mest vanliga forðingin hjá kvinnum, ið ætla at fáa fosturtøku.[158] Orsøkin til, at ættleiðing kann kennast so svár, er tann sama, ið ger fosturtøku so oyðileggjandi – tað snýr seg um eitt mannalív.

Ættleiðing verður mangan neiliga lýst í lesnaði, ið talar fyri fosturtøku. Carole Anderson og Lee Campbell siga um ættleiðing: „Tíverri er ættleiðing alt ov vanlig. Óneyðugi skilnaðurin millum mammu og barn er so ræðuligur, at hetta er ein revsing, ið kann vara alt lívið."[159]

Tá ið ættleiðing verður søgd at vera ræðulig, verður gloymt at siga frá lívlongu skuldarkensluni, ein kvinna hevur, tá hon fatar, at hon hevur dripið sítt egna barn. Ættleiðing er neyvan ein revsing fyri eina kvinnu, ið veit, at hon ikki megnar at uppala sítt egna barn. Hóast tað kann kennast hart, so er tað ein valmøguleiki, sendur omanífrá.

Umframt ta umfatandi *Encyclopedia of Adoption* við meir enn 400 upplýsandi greinum um allar síður av ættleiðingini,[160] finnast fleiri aðrar frálíkar keldur á alnetinum um ættleiðing.[161] Vit skylda bæði kvinnum og børnum at verða kunnað um ættleiðing.

**Fosturtøka rænir familjurnar, sum bíða eftir at sleppa at ættleiða**

Við at ganga alla viðgongutíðina tekur ein ung kvinna ábyrgd. Hon veksur og búnast. Hon kann líta afturá við stoltleika og nøgdsemi, tí hon gjørdi tað rætta við at loyva barni sínum bæði eitt lív og eina góða familju. Sjálvandi er ættleiðing bert ein valmøguleiki. Unga kvinnan kann jú velja sjálv at hava barnið og uppala tað. Bæði valini kunnu vera røtt.

„Hvør mamma hevði eg verið, um eg gav barn mítt burtur til ættleiðingar?" spyrja summar. Tað løgna er, at ein mamma, ið ikki vildi givið barn sítt burtur, tí tað er ov dýrabart, vil heldur drepa tað sama barnið. Spurningurin, hon átti at sett, er ikki: „Hvussu kann eg geva barn mítt burtur til ættleiðingar?" Men: „Hvussu kann eg drepa mítt egna barn við fosturtøku?" Hóast hon ikki er før fyri at taka sær av sínum egna barni, dugir hon so ikki at síggja, at hon átti at givið øðrum barn sítt at taka sær av og elska? Tíverri er tað ikki so einfalt.

Kvinnan vil hava ein enda á sínari kreppu, og ættleiðing tykist ikki at loysa hennara støðu „við ótryggleika og skuldarkenslu, so langt eygað dugir at síggja, bæði fyri hana og barnið."[162] Hon sær møguliga seg sjálva ikki bara sum eina mammu, men eina vánaliga mammu, ið læt barn sítt upp í hendurnar á fremmandum. Hon óttast fyri, at hon hevði svikið barnið, ella at tað møguliga verður misnýtt. Skynsemi hennara er grundað á ta ynskihugsan, ið sigur, at um hon fær fostrið tikið, so er barnið ikki eitt barn, og hon er ikki ein mamma. Í veruleikanum kann hon ikki velja, um hon er mamma ella ikki, ella um barn hennara er veruligt. Bæði hesi eru óbroytiligir veruleikar. Hennara barn *er* veruligt, og tí *er* hon mamma. Spurningurin er bara, hvat hon, mamman, vil gera við sítt egna barn?

Av tí at hon enn ikki hevur knýtt verulig bond við barn sítt, kann fosturtøka tykjast sum ein løtt loysn. At verðið skild frá barni sínum, eftir at tað er komið í verðina, hevði verðið sera trupult kensluliga. Men



lívið hjá barninum er líka veruligt, áðrenn bond verða knýtt, sum aftaná. Kvinnan hevur trý í at velja: At føða barnið og sjálv uppala tað, at føða barnið og loyva aðrari familju at uppala tað ella at drepa barn sítt. Hóast fosturtøka ofta tykist mest lokkandi, so er hon, tá ið samanum kemur, mest oyðileggjandi.

Vit eiga at hjálpa ungum kvinnum at síggja, hvat barnauppaling, ættleiðing og fosturtøka í veruleikanum eru. Vit eiga at vísa á ættleiðing sum eitt djarvt val – eitt val, ið gevur einum barni og eini familju lív.

Unga gentan, ið vit tóku okkum av, hevði verið ígjøgnum tvær fosturtøkur, men saman við okkum gekk hon alla viðgongutíðina og gav barn sítt burtur til ættleiðingar. Tað var ikki lætt, men nøkur ár seinni segði henda ótrúliga kvinnan mær: „Eg minnist míni trý børn, sum eg ikki longur havi, men við sera ymiskum kenslum. Tey bæði, eg fekk beint fyri við fosturtøku, fylla meg við sorg og iðran. Men tá eg hugsi um tað, eg gav burtur til ættleiðingar, gleðist eg, tí eg veit, at tað verður uppfostrað hjá einari familju, ið ynskti sær mítt barn."

Tað kristna samfelagið átti at staðið saman um at beina burtur ta neiligu umrøðu, ið ættleiðing fær. Vit eiga at tosa jaliga um ættleiðing og vísa ungum kvinnum, ið geva børn síni burtur til ættleiðingar, stóra virðing. Vit eiga alment at heiðra ættleiðingarforeldur og vælsigna ættleidd børn. Vit eiga at vísa á ættleiðing sum nakað sera gott og eiga at hálova tí í kirkjum og samkomum okkara. Bert við at gera hetta kunnu vit hjálpa ungum kvinnum at síggja ættleiðing sum eitt djarvt val og eitt val, ið bæði tær og børn teirra seinni fara at vera æviga takksom fyri.

Frítt val endar við at merkja einki val ella vánaligt val. Men harafturímóti gevur ættleiðing okkum ein valmøguleika, ið er skilagóður og menniskjaligur og samstundis er bestur fyri *allar* partar.

5. partur

# Andalig sjónarhorn og møguleikar

## *Kapittul 18*

# KANN GUD FYRIGEVA FOSTURTØKU?

Milliónir av kvinnum og monnum líða undir skuldarkensluni, ið fosturtøka hevur við sær. Sum vit sóu í fyrsta kapitli, siga tveir triðingar av teimum, ið fáa fosturtøku, seg vera antin protestantar ella katolikkar. Næstan ein av hvørjum fimm kvinnum, ið fáa fosturtøku, siga seg vera evangeliskt kristnar.[163] Fleiri av pápunum at hesum børnum eru eisini limir í okkara kirkjum og samkomum.

Ert tú kvinna, ið hevur fingið fosturtøku ella hevur rátt aðrari kvinnu til fosturtøku, so er hesin kapittulin til tín. Ert tú mannfólk, ið hevur verið við til at taka avgerð um fosturtøku – sama um tað hevur verið í sambandi við gentuna, konuna, dóttrina ella onkran annan – so er hesin kapittulin eisini til tín.

Tað fer at virka beint øvut at royna at koma sær undan skuldarkenslum, um tú ikki tekur tær av orsøkini. Onkur sigur kanska: „Tú hevur ikki gjørt nakað skeivt." Men tú veitst betur. Bara við at avnokta veruleikan kanst tú koma tær undan skuldarkenslunum. Avnoktan slóðar fyri kensluligum skrædli, hvørja ferð eitthvørt minnir teg um barnið, tú einaferð bart undir belti. Tú hevur brúk fyri eini varandi loysn á trupulleikunum, ið standast av skuldarkenslum, og tað er ein loysn, ið má grundast á veruleikan, ikki á undanførslur.

Av tí at Bíblian bjóðar hesa loysnina, skal eg endurgeva úr henni. Bið prestin, samkomuleiðaran, leiðaran í kvinnubólkinum, ein kristnan vin ella onkran í familjuni um at hjálpa tær at skilja.

**Gerningur Krists**

Tey góðu tíðindini eru, at Gud elskar teg og vil fyrigeva tær tína fosturtøku, sama um tú visti ella ikki visti, hvat tú gjørdi. Men áðrenn tey góðu tíðindini kunnu virðismetast, er neyðugt at kenna tey ringu tíðindini. Tey ringu tíðindini eru, at tað eru sonn moralsk misbrot, og øll eru vit sek í mongum misbrotum mótvegis Gudi. Fosturtøka er bert eitt av hesum.



„Tí at øll hava syndað, og teimum vantar Guds heiður"
*(Rómverjabrævið 3,23).*

Synd skilir okkum frá einum sambandi við Gud (Jesaja 59,2). Synd lumpar okkum, fær okkum at halda, at rangt er rætt, og rætt er rangt (Orðtøk Sálomons 14,12). „Tí at løn syndarinnar er deyði, men náðigáva Guðs er ævigt lív í Kristi Jesusi, harra okkara" (Rómverjabrævið 6,23). Jesus Kristus, Sonur Guds, elskaði okkum so nógv, at Hann gjørdist partur av mannaættini fyri at loysa okkum frá syndatrupulleika okkara (Evangeliið eftir Jóhannes 3,16). Hann gjørdi seg til eitt við okkum í veikleika okkara uttan at verða dálkaður av synd okkara (Hebrearabrævið 2,17-18; 4,15-16). Jesus doyði á krossinum sum tann einasti, sum var verdur at gjalda bótina fyri okkara synd, sum Guds heilagleiki kravdi (Seinna Korintbrævið 5,21). Hann reis upp frá teimum deyðu, vann á syndini og sigraði á deyðanum (Fyrra Korintbrævið 15,3-4, 54-57). Tá Kristus doyði á krossinum, segði Hann: „Tað er fullgjørt!" (Evangeliið eftir Jóhannes 19,30). Grikska orðingin, ið er týdd til „tað er fullgjørt", varð ritað á skuldarbrøv, tá skuldin varð strikað. Hetta merkir „goldið". Kristus doyði fyri at strika alla okkara skuld.

**Full fyrigeving**

Orsakað av Kristusar gerningi á krossinum okkara vegna bjóðar Gud okkum fyrigeving. Her er nakað av tí, Gud bjóðar okkum:

Hann fer ikki við okkum eftir syndum várum og lønir okkum ikki eftir misbrotum várum... Sum eystrið er fjarlagt frá vestri, so hevur hann firrað misgerðir várar frá okkum. Sum ein faðir er mildur mót børnum sínum, so er Harrin mildur mót okkum, sum hann óttast.
*(Sálmarnir 103,10, 12-13)*

Um vit játta syndum okkara, tá er hann trúfastur og rættvísur, so at hann fyrigevur okkum syndirnar og reinsar okkum frá allari órættvísi.
*(Hitt fyrsta almenna bræv Jóhannesar 1,9)*

So er tá nú eingin fordøming fyri tey, sum eru í Kristi Jesusi.
*(Rómverjabrævið 8,1)*

**Ein gáva, ið ongin hevur uppiborið**

Frelsan er ein gáva – „Tí av náði eru tit frelstir, við trúgv, og tað er ikki tykkum at takka, tað er Guðs gáva; ikki av gerningum, fyri at eingin skal rósa sær" (Efesusbrævið 2,8-9). Hesa gávu kann ongin arbeiða seg til ella gera seg uppibornan til. Hon er ikki treytað av okkara gerningum, men einans av Kristusar ofri okkara vegna.

Gud bjóðar okkum gávuna fyrigeving og ævigt lív, men hon er ikki okkara av sær sjálvum. Fyri at fáa hesa gávu mugu vit fyrst velja at taka ímóti henni.

Tú hugsar kanska: „Men eg havi ikki uppiborið fyrigeving eftir alt tað, eg havi gjørt." Tað er púra satt. Ongin okkara hevur uppiborið fyrigeving. Um vit høvdu uppiborið hana, so høvdu vit ikki havt brúk fyri henni. Tað er júst endamálið við náðini. Gud tók tað, ið vit høvdu uppiborið, á krossinum, soleiðis at vit kunnu fáa tað, ið vit ikki hava uppiborið – reina talvu, nýggja byrjan.

Hava vit fingið fyrigeving, kunnu vit gleða okkum til at vera saman við Kristusi og okkara andligu familju í ævinleikanum (Evangeliið eftir Jóhannes 14,1-3; Opinberingin 20,11-22,6). Vit kunnu gleða okkum til at verða sameinað av nýggjum við okkara kæru í himli (Fyrra Tessalónikubrævið 4,13-18).

**Tær nýtist ikki at dvølja við gamlar syndir**

Ein syndafull kvinna vætti føtur Jesusar við tárum sínum, kysti teir og turkaði teir við hári sínum. Jesus segði tá við ein heldur dømandi áskoðara: „Av teirri grund sigi eg tær: Hennara mongu syndir eru henni fyrigivnar, tí at hon elskaði mikið" (Evangeliið eftir Lukas 7,47). Jesus bjóðar okkum øllum somu fyrigeving.

Gud vil ikki, at tú skalt ganga gjøgnum lívið og revsa teg sjálva fyri tína fosturtøku ella aðra synd, ið tú hevur framt. Tín lutur er at taka ímóti Kristusar sáttargerð, ikki at endurtaka hana. Jesus segði við eina siðleysa kvinnu: „Syndir tínar eru fyrigivnar ... Trúgv tín hevur frelst teg; far tú í friði" (Evangeliið eftir Lukas 7,48, 50). Kvinnur, ið samfelagið hevði vrakað, komu til Jesus, og Hann tók væl ímóti teimum við miskunn og fyrigeving.



Sama hvat tú hevur gjørt, so er ongin synd so stór, at Guds náði ikki røkkur. Hann hevur sæð okkum, tá vit hava verið ljótast, men elskar okkum kortini. Tað finnast ongi mørk fyri Hansara fyrigevandi náði. Og onki frælsi kann samanberast við tað frælsi, ið fæst í fyrigevingini.

Tað kann vera, at tú kennir teg reinsaða beinanvegin, tá tú játtar tínar syndir; og tað kann eisini vera, at tær tørvar hjálp at arbeiða teg ígjøgnum tað. Sama hvussu, so hevur tú fingið fyrigeving. Tú eigur at royna at gloyma tað, ið liggur aftan fyri teg, og halda fram ímóti eini ljósari framtíð, ið Kristus hevur gjørt møguliga (Filippibrævið 3,13-14).

Hvørja ferð vit kenna tað, sum vit ikki hava fingið fyrigeving, er tíð at fara aftur til Bíbliuna og minna okkum sjálv, og hvør annan, á Guds fyrigeving.

At fara upp í ein grøðingarbólk fyri kvinnur, ið hava fingið fosturtøku, kann vera ómetaliga stór hjálp. Tað finnast bíbliubólkar, ið eru ætlaðir júst slíkum kvinnum og aðrir fyri menn. Góð hjálp er eisini at finna á alnetinum.[164]

**Rættar avgerðir eftir fyrigeving**

Mangar kvinnur, ið hava fingið fosturtøku, eru væl skiljandi beiskar mótvegis teimum monnum, ið nýttu og misnýttu tær, mótvegis sínum foreldrum, ið kroystu tær, og mótvegis teimum, ið villleiddu tær til at gera eitt val, ið tók lívið av barni teirra. Gud væntar av okkum, at vit taka ímóti tí fyrigeving, Hann hevur givið okkum, og rætta øðrum hana (Evangeliið eftir Matteus 6,14-15).

Tær tørvar at gerast partur av einum viðgerðarumhvørvi, eini familju av kristnum fólki, ið eitur samkoma. (Ert tú longu partur av eini samkomu, sig so onkrum frá tínum upplivingum í sambandi við fosturtøku fyri at fáa ta neyðugu hjálpina.) Tú kennir teg kanska smædna millum kristin fólk orsakað av tíni fortíð. Tað skalt tú ikki vera. Ein sonn samkoma, ið hevur Kristus sum miðdepil, er ikki ein samkoma, har tey rættvísu rósa sær sjálvum, men eitt sjúkrahús, ætlað syndarum. Ongin fer at døma teg fyri syndir, ið Kristus longu hevur fyrigivið. Fólkið, ið tú fert at savnast við, eru líka nógv menniskju og líka ófullkomin, sum tú ert. Flestu teirra eru ikki sjálvrættvís. Tey, ið eru, eiga vit at harmast um, tí tey hava ikki skilt Guds náði. Ein góð samkoma lærir frá sær bíbilskar sannleikar og fer at veita tær kærleika, viðurkenning og stuðul.

Eitt sunt stig, tú kanst taka, er at seta teg í samband við kvinnur, ið fara ígjøgnum eina óætlaða og óynskta viðgongutíð. Gud kann møguliga brúka tínar royndir til at gera teg út til at hjálpa øðrum kvinnum og bera teimum Guds kærleika við tær. Kona mín og eg hava fleiri góðar vinkonur, ið hava fingið fosturtøku. Við teirri orku, tær hava lagt í at verja lív, hava tær givið øðrum kvinnum ta hjálp, ið tær sjálvar høvdu ynskt, at aðrar høvdu givið teimum, tá tær vóru í somu støðu. Tað, at tær søgdu sína søgu, hevur ikki einans bjargað børnum frá deyðanum og mammum frá sorg og skuldarkenslum, men tað hevur eisini verið við til at lekja tær. Tað kann eisini henda teg.



*Kapittul 19*

# AT VERA FYRI LÍVI – DREGUR TAÐ BURTUR FRÁ MISSIÓNSBOÐUM KRISTUSAR ELLA ER TAÐ PARTUR AV TEIMUM?

Fleiri vælmeinandi kristin siga, at kirkjur og samkomur ikki eiga at nevna fosturtøku. Summi siga, at við at tosa um fosturtøku fáa vit fólk at kenna seg sek. Men orsøkin til at tosa um tað er at *steðga* fosturtøku og teimum skuldarkenslum, hon hevur við sær, og at veita teimum, ið hava slíkar skuldarkenslur, hjálp og vón. At okkara kirkjur og samkomur eru fullar av fólki, ið hava fingið fosturtøku ella hava stuðlað upp undir fosturtøku, er vánalig grundgeving fyri ikki at tosa um tað. Í veruleikanum er tað nevniliga besta grundgevingin fyri at seta júst fosturtøku í brennidepilin og lýsa hetta evnið væl og virðiliga og soleiðis bjóða alla ta hjálp og tann stuðul, vit megna.

Ein prestlesandi í samkomu mínari segði nakað við meg ein dagin – nakað, ið eg mangan havi hoyrt áður: „Evni sum fosturtøka verða bert brúkt til at leiða ein burtur frá høvuðsmálinum."

„Hvat er høvuðsmálið?" spurdi eg.

„Missiónsboðini," segði hann. „At leiða fólk til Kristus. Tað er tað, ið vit eru ætlað at gera. Alt annað er bara villleiðing."

Hann sipaði til orð Kristusar: „Farið tí og gerið øll fólkasløgini til lærusveinar mínar, við tað at tit doypa tey til navns faðirsins og sonarins og hins heilaga anda, og við tað at tit læra tey at halda alt tað, ið eg havi boðið tykkum" (Evangeliið eftir Matteus 28,19-20).

Hevði hann rætt? Er virksemið fyri lívi ein villleiðing frá missiónsboðum Kristusar... ella partur av teimum?

**Ein maður, ið æt William**

Fyri 200 árum síðan var ein onglendingur, ið æt William. Hann var ein bersøgin mótstøðumaður móti trælahaldi. Hann boykottaði sukurvørur úr Vesturindia, tí trælir høvdu framleitt vøruna. William kendi, at Gud vildi hava hann at fara til India, har hann gjørdist skelkaður av at síggja, at nógvir hinduar settu nýføðingar sínar út at doyggja. Tey fóru eisini frá teimum veiku og sjúku. Bretska stjórnin í India vendi blinda eygað til, tí hon vildi hvørki blanda seg upp í teirra mentan ella religión; men William kendi seg noyddan at leggja seg uppí, tí fólk doyðu jú.

Ein dagin var William vitni til eina siðvenju, ið verður nevnd *sati*. Her verða einkjur brendar livandi á jarðarferðabálum saman við deyða manni sínum. Eftir at hava sæð eina slíka hending reisti hann seg upp framman fyri einum bólki, ið var savnaður til at brenna eina kvinnu livandi. Hann segði teimum, at henda siðvenjan var skeiv. Hann savnaði fleiri trúboðarar at mótmæla saman við sær. Hann skipaði fyri almennum kjaki um evnið fyri at seta tað í eitt kristiligt ljós.

Sunnumorgunin 6. desembur í 1829 eftir fleiri ára virksemi fekk William alment viðtiknu lógina, ið bannar einkjubrenning. Eftir ætlan skuldi hann prædika henda morgunin, men tað gjørdi hann ikki. Ístaðin setti hann allan dagin av til at týða lógina til bengalskt, tí hann visti, at fleiri lív vóru treytað av hesari týðing.

Fleiri ákærdu William fyri hansara moralska og politiska virksemi. Tey søgdu: „Tað er ikki tí, at tú ert her. Halt teg til høvuðsendamálið. Prædika og bið."

Hvør var hesin sosiali aktivisturin, ið hevði so stóran áhuga fyri morali og lógum og at bjarga lívum? Tað var William Carey, í dag kendur sum „faðirin at nútíðar trúboðanarvirkseminum". Tá vit hugsa um missiónsboð Kristusar og nútíðar trúboðanarvirksemi, skarar onki navn so framúr sum júst hansara.

Carey fór til India at vinna fólk fyri Kristus og at læra tey, ikki bert við at siga frá gleðiboðskapinum, men at liva hann – sum fevndi um at leggja seg uppí og arbeiða fyri at broyta siðvenjur og óndar lógir – og eisini at bjarga lívum.



**Fótafet at fylgja**

John Wesley var harðliga ímóti trælahaldi. Charles Finney hevði ein týðandi leiklut í Underground Railroad felagsskapinum, ið hjálpti nógvum trælum, samstundis sum funnist varð at honum fyri borgarligt ólýdni. D. L. Moody læt upp bústaðir fyri fátækar gentur og bjargaði teimum frá misnýtslu. Charles Spurgeon bygdi heim til at taka sær av eldri kvinnum og at hjálpa heimleysum børnum burtur úr gøtulívinum í London. Amy Carmichael blandaði seg upp í kynsligu misnýtsluna av gentum í India og bjargaði teimum frá at selja seg sjálvar í templum. Hon bygdi teimum bústaðir, skúla og sjúkrahús.

Øll hesi eru kend sum trúboðarar og evangelistar, kend sum fólk, ið fóru við missiónsboðum Kristusar. Kortini geva vit okkum sjáldan far um, hvussu ómetaliga yvirgivin tey vóru til at blanda seg uppí persónliga og sosialt fyri tey veiku, fátøku og misnýttu.

Møguliga hevði teirra evangelisering slíka ávirkan, júst tí tey livdu tann gleðiboðskap, ið tey talaðu um. Gleðiboðskapurin er ikki í stríð við sosiala umsorgan og persónliga uppíblanding í kor teirra fátæku. Í veruleikanum er eitt beinleiðis samband millum tey.

**Partur av „høvuðsmálinum"**

Vit eiga at royna at bjarga lívum av teirri einføldu orsøk, at Bíblian, ið okkara kirkjur og samkomur hvørja viku tala úr, sigur, at vit skulu:

Bjarga teimum, sum leidd verða til deyða.
(Orðtøk Sálomons 24,11)
Veitið teimum veiku og faðirleysu rætt,
latið neyðstødd og fátæk fáa sømdir.
(Sálmarnir 82,3)
Tú skalt elska næsta tín eins og sjálvan teg.
(Evangeliið eftir Matteus 19,19)
Einkjum og faðirleysum børnum eiga Guds fólk
at vísa serliga umsorgan (Hitt almenna bræv Jákups 1,27).
Hvør hóskar betur til hesa áheitan enn júst ógifta kvinnan og ófødda barn hennara?

Vit lesa um hin lógkøna, ið spurdi Jesus: „Hvat eigi eg at gera, fyri at eg kann arva ævigt lív?“ (Evangeliið eftir Lukas 10,25) Jesus segði: „Elska næsta tín sum sjálvan teg“ (v. 27). Jesus segði, at tað at elska Harran er hitt stóra og fyrsta boðið, og at elska næstan eins og teg sjálvan er tað næststørsta (Evangeliið eftir Matteus 22,37-39). So missiónsboðini eru í sjálvum sær ikki tað størsta boðið... tey eru heldur partur av at elska Gud og at elska næstan.

Einki letur upp dyr fyri evangelisering sum tænastur millum fólk, ið hava hjálp fyri neyðini. Lesandi, ið røða um fosturtøku, hava vanliga uppfylgjandi samrøður, ið kunnu hava við sær, at gleðiboðskapurin verður boðaður. Tey, ið arbeiða á ráðgevingarmiðstøðum fyri barnakonur, hava góðar møguleikar at boða boðskapin eins og tey, ið útflýggja faldarar við fosturtøkuklinikkir og fara á skúlar at kunna um fosturtøku. Fólk, ið taka barnakonur til sín, vísa kærleika, ið hevur við sær, at gleðiboðskapurin verður boðaður. Sama nær vit møta fólki, ið tørvar hjálp, verður evangelisering bæði natúrlig og trúlig.

**Missiónsboð Kristusar: Trý sjónarmið**

Vit mugu umhugsa trý sjónarmið, um vit skulu skilja sambandið millum missiónsboð Kristusar og ta orku, ið verður løgd í virksemið fyri lívi.

1. Missiónsboð Kristusar eru eini høvuðsboð, men Jesus segði onnur boð vera størst. Missiónsboð Kristusar eru í veruleikanum bara ein víðkan av boðunum um at elska Gud og næstan.

2. Um evangelisering var alt, ið var tengt at missiónsboðum Kristusar, so hevði stríðið fyri teimum, hvørs lív eru hótt, verið hóskandi, tí tað letur upp fyri evangelisering.

3. Jesus bað okkum ikki einans um at evangelisera. Hann bað okkum um at „læra tey at halda alt tað, ið eg havi boðið tykkum“ (Evangeliið eftir Matteus 28,20). Hann segði ikki „læra tey at *trúgva*“, men „læra tey at *halda*“.

Jesus áleggur okkum at sýna samhuga og at ofra okkum fyri tey veiku og neyðstøddu. Hetta er partur av „at halda alt tað, ið eg havi boðið tykkum.“ Og um vit ikki gera tann partin og ikki læra onnur at gera tann partin, gera vit ikki tað, ið er boðið okkum at gera.



Um kirkjur og samkomur ikki leggja uppí og verja tey óføddu og mammur teirra, og um vit ikki læra onnur at hjálpa teimum, halda vit ikki tað, ið okkum er boðið.

Kirkjur og samkomur eiga at vera stuðulin undir Guds virki fyri teimum neyðstøddu. Um tín samkoma ikki virkar nóg mikið fyri teimum óføddu og mammum teirra, so heitir Gud kanska á teg um at bjóða teg fram og hjálpa samkomuni og leiðarum tess at virka fyri hesum sera týðandi øki.

## *Kapittul 20*

# HVUSSU KANN EG HJÁLPA ÓFØDDUM BØRNUM OG MAMMUM TEIRRA?

Tað finnast nógvir framúr felagsskapir fyri lívi um landið og kring heimin. Teir fáast við alskyns virksemi, sum fevnir um at undirvísa í fráhaldi og fosturmenning, at ráðgeva barnakonum, ávirka lóggávu, bjóða ættleiðing, gera vart við fosturtýning í okkara samfelagi, kunna um vísindalig og sálarlig kanningarúrslit, mótmæla fosturtøkuklinikkum, ráðgeva uttan fyri fosturtøkuklinikkir og hjálpa kvinnum og monnum eftir fosturtøku. Tey biðja saman við tær. Har eru yrkislærdir ráðgevar, ið bjóða ráðgeving og svara telefonuppringum og teldubrøvum alt samdøgrið.[165]

**Áheitan um at standa saman um at verja lív**

Tey seinastu 20 árini havi eg havt tann heiður at arbeitt saman við og eygleitt nógvar felagsskapir fyri lívi. Eg havi sæð stóru styrkirnar í ymiskum átøkum, sum røkka ymiskar áhoyrarar og draga til sín ymisk sjálvboðin og stuðlar.

Væl skiljandi brenna tey, ið vilja verja lív, fyri síni søk og halda eisini viðhvørt, at teirra arbeiðsháttur er tann besti, tann rætti ella kanska tann *einasti* hátturin. Hetta er stuttskygt og kann berast saman við, at ein sjómaður sigur, at flakakvinnur ikki gera eitt týdningarmikið arbeiði, og tí eiga tær allar at vera sjómenn. Uppgávan at verja lív, at vera fyri lívi, er sera stór og fjølbroytt og krevur tí margfaldar framferðarhættir. Vit eiga *ikki* øll at royna at gera tað sama.

Hetta er álagt okkum: „Verið allir samhugaðir, samlíðandi, blíðir við brøðurnar, miskunnsamir, eyðmjúkir“ (Hitt fyrra almenna bræv Pæturs 3,8). Eyðmjúk sinni og bleyt hjørtu eru skjót at læra av øðrum við øðrvísi persónleika, gávum, áhugamálum og ætlanum. Vit hava brúk fyri spakføri, langmóði, kærleika og samhuga í Guds anda (Efesusbrævið 4,1-6).



Í nógv ár leiddi eg ein fund, ið varð hildin annan hvønn mánað, har ymisk ábyrgdarfólk fyri ymsar felagsskapir fyri lívi møttust. Vit komu at kenna, skilja og læra hvør av øðrum. Vit komu fram til átøk, ið vit kundu samstarva um, og vit funnu út av, at fleiri okkara høvdu brúkt nógva tíð og orku at framleiða tilfar og gera mannagongdir, ið onnur longu høvdu gjørt og fingið greiðu á. Fleiri søgdu mær, at tey ongantíð høvdu skilt fleiri av hinum felagsskapunum og vóru ivasom um teirra framferðarhættir. Tey høvdu enntá kent tað, sum um tey kappaðust. Men sum tey komu at kenna hesi fólk, sóu tey hjørtu teirra og skiltu endamál teirra. Tey komu at elska og vera takksom fyri brøður og systrar sínar, ið Gud hevði kallað til øðrvísi átøk og framferðarhættir.

Leita upp teir felagsskapir, ið hóska best til tína bakgrund, persónleika og gávur, og fylg ætlanarvegi Guds. Upplýsingar eru tøkar um nógvar fjølbroyttar felagsskapir, landsfevnandi, økisfevnandi og staðbundnar felagsskapir.[166] **Tørvar tær hjálp at finna ein felagsskap í tínum nærumhvørvi, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum.**[167]

**Hetta kanst tú gera**

Um tú ert í einari kirkju ella samkomu, ið lærir Bíbliuna og setur álit sítt á Kristus, set teg so í samband við fyristøðufólkið har og spyr eftir átøkum fyri lívi í samkomu og nærumhvørvi tínum. (Ert tú ikki partur av einari slíkari samkomu, finn so eina.) Vit mugu koma burtur frá hesum, at „eg eri bara ein persónur, vit eru bara ein lítil samkoma, vit kunnu ikki gera nakran mun". Tú kanst ikki taka alla neyðina burtur, men Gud kann brúka teg til at nøkta tørvir á spennandi hátt. Hvussu hjálpir tú milliónum av neyðstøddum? Einum í senn.

Tað, sum er nevnt niðanfyri, er ikki nakað, ið øll skulu gera, men er bert eitt yvirlit, har tú kanst velja tað burturúr, ið hóskar best til tínar gávur og førleikar:

1. *Lat heimið upp*. Hjálp einari gentu, ið er vorðin við barn ella bjóða einum „óynsktum" barni at koma til fosturs ella ættleiðingar. Ella set av ein dag í vikuni til at taka tær av børnum hjá støkum mammum.
2. *Bjóða fram tína tíð, førleikar og tænastu*. Bjóða barnakonum, nýføðingum, foreldraleysum børnum, førleikaskerdum, eldri fólki, heimleysum og øðrum, ið hava hjálp fyri neyðini, tína persónligu umsorgan. Gev ráðgevingarmiðstøðum fyri barnakonur, ættleiðingarfelagsskapum, kvinnuhúsum, fráhaldsrørslum og felagsskapum, ið arbeiða fyri rætti til lív, tíð, útgerð, innbúgv, klæði, yrkisligar førleikar og pening. Slá gras fyri tey, vaska og rudda fyri tey, ger teimum eina heimasíðu o.a.
3. *Ver stigtakari*. Er onki virksemi fyri lívi nærindis, umhugsa so at fara undir eitt. Fá samstarv í lag. Hugsa um at leiga høli nærhendis eini fosturtøkuklinikk ella eina Planned Parenthood skrivstovu. Fá í lag eina ráðgevingarstovu fyri barnakonur ella eina kunningarstovu fyri lívi. Ger ein vakran minnisvarða til tey óføddu. Tað kann eisini gerast sum ein rósugarður við kirkjuna, samkomuna ella onkustaðni í tínum nærumhvørvi.[168]
4. *Ogna tær nágreiniliga kunning*. Kenn veruleikan, so at tú kanst fyrireika tey bestu mótprógvini móti grundgevingunum fyri fríari fosturtøku.[169] Nógvar góðar bøkur, ljóðbond og sjónbond eru tøk eins væl og framúr (og vanliga ókeypis) tíðindabrøv fyri lívi. Eisini eru nógvar avbera góðar heimasíður.[170] Talið á skurðviðgjørdum fosturtøkum er fallandi, men talið á evnafrøðiligum fosturtøkum er vaksandi. Set teg væl inn í hesi evni, eisini RU-486, t.e. angribollin. Kanna Norplant, Depo-Provera, the Mini Pill og enntá p-bollan – øll hesi forða í høvuðsheitum fyrst og fremst gitnaði, og kortini loyva tey gitnaði viðhvørt, men kunnu tá steðga nýgitna persóninum í at festa seg í lívmóðurveggin og elva tí til fosturtøku tíðliga.[171] Kunna teg so mikið, at tú kanst gera tína egnu niðurstøðu.
5. *Tosa við vinir, grannar og starvsfelagar tínar*. Eggja øðrum blídliga til at umhugsa teirra støðu av nýggjum. Gev teimum eitt eintak av hesi bók við nøkrum merktum blaðsíðum, ið tey kunnu geva gætur. Set teg meira nágreiniliga inn í evnið í míni meira umfatandi bók, *ProLife Answers to ProChoice Arguments*. Být út skaldsøgur við hesum evni, sum eitt nú *The Atonement Child* eftir Francine Rivers, *Tears in a Bottle* eftir Sylviu Bambola og mína egnu *Deadline*.
6. *Far undir kjak um fosturtøku*. Før fram sjónarmið fyri lívi í kjatttorgum. Umhugsa at stovna tína egnu heimasíðu fyri lívi. Ring inn og sig tína hugsan í kjaksendingum og bið um javnbjóðis tíð í útvarpi og sjónvarpi at leggja fram sjónarmiðini fyri lívi. Bílegg og být út tilfar um evnið. Sig frá, so at stóra fylgið av fólki fyri vali fær mótmæli. Sum eg vísi á í bók míni, *The Grace and Truth Paradox* er tað av alstórum týdningi, at vit á sømiligan hátt bjóða evnum sum fosturtøku av. Jesus kom, fullur av náði og sannleika (Evangeliið eftir Jóhannes 1:14). Um fólk skulu síggja Jesus í okkum, mugu vit boða sannleikan við náði.
7. *Skriva brøv*. Skriva vinaliga, stutt, greitt og hugkveikjandi. Endurgev styttri brot t.d. úr hesi bók. Lesarabrøv í landsfevnandi bløðum og tíðindabløðum verða lisin av nógvum.
8. *Eggja til handilsboykott móti fosturtøkuklinikkum*. Set teg í samband við týðandi fólk, ið kunnu hava ávirkan. Greið fyritøkum, stovnum o.ø. frá, at tú ikki við góðari samvitsku kanst stuðla teimum, ið bjóða vørur og tænastur fyri at drepa børn.

9. *Ver politiskt virkin*. Bið um fund við tíni politisku umboð og greið frá tínum fosturtøkusjónarmiðum. Heit á politikararnar um at taka sjónarmiðini fyri lívi upp til viðgerðar og atkvøðugreiðslu. Stilla upp til býráðsval, løgtingsval, skúlastýri o.a. Stuðla valevnum, ið eru ímóti fríari fosturtøku. Stuðla við tíð og peningi. Far á val.
10. *Far uppí ella skipa ein arbeiðsbólk í kirkju ella samkomu tínari*. Spyr tíni fyristøðufólk um vegleiðing. Gev teimum kunnandi tilfar, bið tey hyggja eftir einum sjónbandi. Fá onnur fólk, ið eisini stuðla øðrum arbeiði í samkomuni, at hjálpa tær at orða og seta í verk eina ætlan um kunning og frálæru. Bið um regluligar innsavningar til arbeiðið ímóti fríari fosturtøku. Fyriskipa upplýsandi tilfar til samkomuna at býta út.[172] Útflýggja øllum í samkomuni eitt eintak av *Hví verja lív?* Vilja leiðararnir hava hugskot til sín boðskap, vís teimum so á tað nógva og góða tilfarið, ið er til taks.[173]
11. *Brúka tað góða tilfarið fyri lívi*. Sýn í samkomuni filmstilfar sum eitt nú „Life is Sacred."[174] Umhugsa at sýna ein film, ið lýsir eina fosturtøku.[175] (Fyrireika fólk og ávara frammanundan um, at hetta er óhóskandi fyri børn.) Útflýggja upplýsingar um, hvørjir aðrir bólkar og felagsskapir við sama endamáli eru, og hvussu ber til at koma í samband við teir. Hong lýsingar upp ymsastaðni við t.d. telefonnummari, ið barnakonur kunnu ringja til. Far undir ein ráðgevingarbólk, ið skal vera sjónligur í býnum. Legg ætlanir um eina bønarnátt ella eina mótmælisgongu. Set teg í samband við aðrar bólkar; tey vita nógv, ið tú ikki veitst, og veita tey tær fegin eina hjálpandi hond.
12. *Bið dagliga fyri virksemi fyri lívi, kirkjum og samkomum, prestum og samkomuleiðarum, mammum og børnum*. Fyriskipa tín egna bønarbólk. Um vinnast skal á hesum barnamorðum, um sannleiki ljóssins skal sigra á hesum myrkursins valdi, krevur tað eitt andligt stríð, ið má verða strítt við eyðmjúkari og áhaldandi bøn (Efesusbrævið 6,10-20).



13. *Gev til felagsskapir fyri lívi*. Eg havi vitjað fleiri slíkar felagsskapir. Eg havi sæð hvussu stóran mun, ið hesir felagsskapir gera. Eg vil eggja tær og tínari samkomu til at leita upp ein ella fleiri slíkar felagsskapir og at stuðla teimum ríkiliga.

Spyr teg sjálva: „Hvat hevði eg ynskt fimm minuttir eftir, at eg eri deyð, at eg hevði havt givið teimum hjálparleysu, meðan eg enn var før fyri tí?" Hví ikki brúka restina av lívi okkara til at loka tað gapið, ið er millum tað, ið vit høvdu ynskt, at vit høvdu givið, og tað, ið vit *nú* geva?

Vit fáa eitt stutt bil – eina lívstíð á jørð – at brúka okkara førleikar til at gera mun fyri allar ævir. Ímynda tær ta løtuna í himli, tá ein kemur til tín stórsmílandi og sigur við teg: „Takk fyri! Tínar gávur bjargaðu mínum lívi... og mínum barni." Hvussu hevði tú kent tað?

# NOTUR


1 "Gallup: Seventy-Two Percent of Teens Say Abortion Wrong," 24. november 2003, WorldNetDaily.com.

2 „New National Abortion Poll Shows Majority of Americans Are Pro-Life," (desember 2003 Zogby International Poll, almannakunngjørt 16. januar 2004, 209.157.64.200/focus/f-news/1062123/posts).

3 January 23, 1994, „Young People Swell Crowd at Washington March for Life," 209.157.64.200/focus/f-religion/1064531/posts.

4 www.standupgirl.com.

5 „Abortion. Facts at a Glance," (New York: Planned Parenthood of America), 1.

6 The Alan Guttmacher Institute website, www.agi-usa.org/pubs/fb_induced_abortion.html; Facts in Brief, broytt í februar 2000.

7 Alan Guttmacher Institute, „Induced Abortion," Facts in Brief, februar 2002.

8 James Patterson and Peter Kim, The Day America Told the Truth (New York: Prentice Hall Press, 1991), 32.

9 Lydia Saad, „Americans Divided Over Abortion Debate," 18. mei 1999, Gallup News Service Releases; www.gallup.com/content/login.aspx?ci=3847.

10 Family Planning Perspectives, juli-august 1996, 12.

11 Randy Alcorn, ProLife Answers to ProChoice Arguments (Sisters, OR: Multnomah Publishers, 2000), 313-22; „Biblical Perspectives on Unborn Children," www.epm.org/articles/aobrbibl.html.

12 „Gallup Finds Two-Thirds of Americans Believe Abortion Is Morally Wrong," juni 2003, www.lifesite.net/ldn/2003/jun/03060308.html.

13 Paul Swope, „Adoption: A Failure to Communicate," First Things, apríl 1998, 31-35. Sí www.firstthings.com/ftissues/ft9804/articles/swope.html.

14 Subcommittee on Separation of Powers to Senate Judiciary Committee S-158, Report, 97th Cong., 1st Session, 1981.

15 Ibid.

16 Ibid.

17 Lovejoy Surgicenter v. Advocates for Life Ministries, et al., 1989, vitnisburður frá Aileen Klass.

18 Alexander Tsiaras, From Conception to Birth: A Life Unfolds (New York: Doubleday, 2002).

19 Missouri Revised Statutes, chapter 1, „Laws in Force and Construction og Statutes," Section 1.205, 28. august 2003. www.moga.state.mo.us/statutes/C000-099/0010000205.htm.

20 R. Houwink, Data: Mirrors of Science (New York: American Elsevier Publishing Co., Inc., 1970), 104-190.

21 Lennart Nilsson, „Drama og Life Before Birth," Life, 30. apríl 1965.

22 „The Facts of Life" (Norcross, GA: Human Development Resource Council), 2.

23 Vincent J. Collins, „Fetal Pain and Abortion: The Medical Evidence," Studies in Law and Medicine (Chicago: Americans United for Life, 1984), 6-7.

24 Newsweek, 9. juni 2003, „The War Over Fetal rights," 40-47.

25 Hetta eru væl grundaðir vísindaligir veruleikar. Les t.d. Landrum Shettles and David Rorvik, Rites of Life (Grand Rapids: Zondervan, 1983), 41-66.

26 Scott Klusendorf, Pro-Life 101: A Step-by-Step Guide to Making Your Case Persuasively (Signal Hill, CA: Stand to Reason Press, 2002).

27 Justin Taylor, „Sticker Shock," World, 17. januar 2004, 43.

28 Leonide M. Tanner, ed., „Developing Professional Parameters: Nursing and Social Work Roles in the Care of the Induced Abortion Patient," Clinical Obstetrics and Gynecology 14 (desember 1971): 1271.

29 Paul Marx, The Death Peddlers: War on the Unborn (Collegeville, MN: St. John's University Press, 1971), 21.

30 Feminists for Life Debate Handbook (Kansas City, MO: Feminists for Life of America, n.d.), 3.

31 Carl Sagan & Ann Druyan, „Is It Possible to Be Pro-Life and Pro-Choice?" Parade, 22. apríl 1990, 4.

32 The First Nine Months (Colorado Springs: Focus on the Family), 3.

33 Preview of a Birth (Norcross, GA: Human Development Resource Center, 1991), 4.

34 Scott Klusendorf, „Harvesting the Unborn: The Ethics of Embryo Stem Cell Research," www.str.org/free/bioethics/harvest.pdf.

35 „Deadline Extended for Comment to NIH on Stem Cells Harvesting," Prolife Infonet, 31. januar 2000.

36 Thomas W. Hilgers, Dennis J. Horan & David Mall, eds., New Perspectives on Human Abortion (Frederick, MD: University Publications of America Inc. Aletheia Books, 1981), 351.

37 Slate: Medical Examiner, „Did I Violate the Partial-Birth Abortion Ban? A Doctor Ponders a New Era of Prosecution," by Dr. Warren M. Hern, 22. oktober 2003; http://slate.msn.com/id/2090215.

38 Mortimer J. Adler, Haves Without Have-Nots: Essays for the 21st Century on Democracy and Socialism (New York: MacMillan, 1991), 210.

39 „Brain-Dead Woman Gives Birth," The Oregonian, 31. juli 1987.

40 www.michaelvlancy.com/sstory.html.

41 Chuck Colson, „Life-and-Death Decisions: Praying for the Supremes," BreakPoint Commentary #000425, 25. apríl 2000.

42 HR 1997 var við atkvøðugreiðslu við navnakalli í senationum 61-38 tann 25. mars 2004.

[43] Madeline Nash, „Inside the Womb," Time, 11. november 2002, 68-77; Debra Rosenberg, „The War Over Fetal Rights," Newsweek, 9. juni 2003, 40-51.

[44] Mark O'Keefe, „Activists Tout Ultrasound Images to Discourage Abortion," Newhouse News Service, www.new-house.com/archive/okeefe021903.html, © 2003.

[45] Jennifer Kabbany, „Abortion vs. Ultrasound," Washington Times, 29. oktober 2003.

[46] Audrey Stout, Marietta, GA, e-mail to Randy Alcorn, 12. februar 2000.

[47] www.logiqlibrary.com/browseAction.cgm?productID=20;
www.geddeskeepsake.com/showcase.html;
www.clearviewultrasound.com/gallery.asp;firstsightultrasound.com/4d_liveSA.htm;
www.demedicalsystems.com/rad/us/4d/virtual.html.
Fleiri myndir eru tøkar á internetinum.

[48] Life, August 1990.

[49] Lennart Nilsson, A Child Is Born (New York: Delacorte Press, 1977).

[50] www.abortiontv.com/AbortionPictures1.htm

[51] Warren Hern, „Operative Procedures and Technique," Abortion Practice (Boulder, CO: Alpenglo Graphics, Inc., 1990), 154.

[52] Naomi Wolf, „Our Bodies, Our Minds, Our Souls," The New Republic, 16. oktober 1995; www.epm.org/articles/naomiwolf.html.

[53] Care Net Report, vol. 4, no. 5. november 2003, Sterling, VA.

[54] Oregon Public Broadcasting, „To the Contrary," former Clinton administration staffer Maria Echaveste, et al., 4. januar 2004.

[55] Mary Fisher, „A New Look at Life," Reader's Digest, oktober 2003, 95-103.

[56] Peter Singer, Practical Ethics (1979), cited in „Peter Singer in His Own Words," Accuracy in Academia, www.academia.org/singerquotes.html.

[57] Jim Newhall, endurtikin av Maureen O'Hagan, „Cross Hairs to Bear," Williamette Week, 3. mei 1995.

[58] Associated Press, endurtikin av Christian Action Council's Action Line, mars-apríl 1991.

[59] Sharon Begley, „Do You Hear What I Hear?" Newsweek, Special Summer Edition 1991, 12.

[60] Ibid.

[61] T. Verney and J. Kelley, The Secret Life of the Unborn Child (New York: Delta Books, 1981).

[62] H. B. Valman and J. F. Pearson, „What the Fetus Feels." (Hetta er ein prentað grein, sum ikki vísir til útgávuna, hon var í. Dr. Valman er leiðandi yvirlækni á Northwick Park Hospital and Clinical Research Center in Harrow; Pearson er royndur fyrilesari og leiðandi burðarlækni og lækni í kvinnusjúkum á Welsh National School of Medicine in Cardiff.)

[63] John Wilke, Abortion Questions and Answers (Cincinnati, OH: Hayes Publishing Co., 1988), 53.

[64] Begley, „Do You Hear?" 14.

[65] Peter Singer, „Sanctity of Life or Quality of Life," Pediatrics, juli 1983, 129.

[66] Singer, „Taking Life: Humans," http://www.petersingerlinks.com/taking.htm; brot úr Singer, Practical Ethics (New York: Cambridge University Press, 1993).

[67] Charles Hartshorne, „Concerning Abortion: An Attempt at a Rational View," The Christian Century, 21. januar 1981, 42-45.

[68] David Boonin, A Defense of Abortion (New York: Cambridge University Press, 2003), 5-9.

[69] Feminists for Life Debate Handbook (Kansas City, MO: Feminists for Life of America, n.d.), 9.

[70] Endurgivið av George Will, The Pursuit of Happiness and Other Sobering Thoughts (New York: Harper Colophon, 1978), 62-63.

[71] Kate Michelman, endurgivin í The New York Times, 10. mei 1988.

[72] Feminists for Life Debate Handbook (Kansas City, MO: Feminists for Life of America, n.d.), 17.

[73] Rosmary Bottcher, „Feminism: Bewitched by Abortion," in To Rescue the Future, ed. Dave Andrusko (New York: Life Cucle Books, 1983).

[74] www.feministsforlife.org/news/commonw.htm.

[75] Susan B. Anthony, The Revolution, 8. juli 1869, 4.

[76] Mattie Brinkerhoff, The Revolution, 9. apríl 1868, 215-16.

[77] Elasah Drogin, Margaret Sanger: Father of Modern Society, (CUL Publications, 1989), 11-13.

[78] R. C. Sproul, Abortion: A Rational Look at an Emotional Issue (Colorado Springs, CO: NavPress, 1990), 117-18.

[79] Guy M. Condon, „You Say Choice, I Say Murder," Christianity Today, 24. juni 1991, 22.

[80] Mary Ann Schaefer, endurgivið av Catherine and William Odell, The First Human Right (Toronto: Life Cycle Books, 1983), 39-40.

[81] The American Feminist, Spring 2003, 14, 17.

[82] „Abortion and Moral Beliefs: A Survey of American Opinion," stýrt av the Gallup Organization, 1991, 4-7.

[83] Wilke, „Woman's Movement," 3.

[84] Condon, „You Say Choice," 23.

[85] Robert Stone, „Women Endangered Species in India," The Oregonian, 14. mars 1989, B7.

[86] Jo McGowan, „In India They Abort Females," Newsweek, 13. februar 1989.

[87] Straits Times report, Bejing, 7. februar 2000; aðrar søgur á www.lifesite.net.

[88] Medical World News, 1. desember 1975, 45. Sí eisini Newsweek, " Brave New Babies," 1. februar 2004.

[89] Mary O'Brian Drum, „Meeting in the Radical Middle," Sojourners, November 1980, 23.

[90] Nat Brandt, The Town That Started the Civil War (New York: Syracuse University Press, 1990); Thomas Clarkson, Slavery and Commerce of the Human Species (Miami, FL: Mnemosyne Publ. Co., 1969); Austin Willey, The History of the Anti-Slavery Cause (Portland, ME: Brown Thurston Publ., endurprentað av Mnemosyne Publ. Co., Miami, 1886).

[91] Sí Robert Jay Lifton, The Nazi Doctors: Medical Killing and the Psychology of Genocide (New York: Basic Books, 1986).

[92] www.teen-aid.org/Links.html;
www.abstinencedu.com;
www.abednet.org;
www.PureRevolution.com.

[93] Serrin M. Foster, „Women Deserve Better Than Abortion," Respect Life, 2003.

[94] Endurgivið av Mary Meehan, „The Ex-Abortionists: Why They Quit," Human Life Review (Spring-Summer 2000), 12.

[95] Elizabeth Shadigan, MD, frágreiðing til hoyring hjá senatsins undirnevnd í vísindi, tøknifrøði og vísindi fyri at kanna likamligu og sálarligu ávirkanina, ið fosturtøka hevur á kvinnur; endurgivið í „Witnesses Ask U.S. Senate for Research into Side Effects of Abortion on Women," Culture & Cosmos, Vol. 1, no. 30, 9. mars 2004.

[96] Brent Rooney & Byron C. Calhoun, MD, „Induced Abortion and Risk of Later Premature Births," Journal of American Physicians and Surgeons, vol. 8, no. 2, Summer 2003.

[97] S. Linn, „The Relationship Between Induced Abortion and Outcome of Subsequent Pregnancies," American Journal of Obstetrics and Gynecology, 15. mei 1983, 136-40.

[98] John A. Richardson & Geoffrey Dixon, „Effects of Legal Termination on Subsequent Pregnancy," British Medical Journal (1976): 1303-4.

[99] B. Luke, Every Pregnant Woman's Guide to Preventing Premature Birth (New York: Times Books, 1995); E. Ring-Cassidy, Woman's Health After Abortion (Toronto: de Veber Institute, 2002).

[100] Family Planning Perspectives, mars-apríl 1983, 85-86.

[101] U.S. Department of Health and Human Services, Morbidity and Mortality Weekly Report 42 (SS-6) 73-85 (13. december 17 1993; apríl 1984).

[102] Ann Aschengrau Levin, „Ectopic Pregnancy and Prior Induced Abortion," American Journal of Public Health (March 1982): 253.

[103] „Ectopic Pregnancy: Prognosis for Subsequent Fertility," www.physicianeducation.org. Accessed 1. mars 2004.

[104] Centers for Disease Control, Press Release, 1. mei 2001, „CDC Reports Highlights Selected Racial and Ethnic Pregnancy-Related Death Rates," http://www.cdc.gov/od/oc/media/pressrel/r010511.htm.

[105] Allan Osser, MD, & Kenneth Persson, MD, „Postabortal Pelvic Infection Associated with Chlamydis Tracomatis andthe Influence of Humoral Immunity," American Journal of Obstetrics and Gynecology (November 1984): 669-703.

[106] Lars Heisterberg, MD, et al., „Sequelae of Induced First-Trimester Abortion," American Journal of Obstetrics and Gynecology (Jult 1986): 79.

[107] Anath, CV, et al.: „The Association of Placenta Previa with History of Cesarean Delivery and Abortion: A Meta-Analysis," American Journal of Obstetrics and Gynecology (November 1997): 1071-78.

[108] Jeffrey M. Barrett, MD, „Induced Abortion: A Risk Factor for Placental Previa," American Journal of Obstetrics and Gynecology (desember 1981): 769.

[109] David Reardon, Aborted Women: Silent No More (Westchester, IL: Crossway Books, 1987), 106.

[110] F. Parazzini, et al., „Reproductive Factors and the Risk of Invasive and Intraepithelial Cervical Neoplasia," British Journal of Cancer, 59:805-9 (1989); H. L. Stewart, et al., „Epidemiology of Cancers of the Uterine Cervix and Corpus, Breast and Ovary in Israel and New York City," Journal of the National Cancer Institute 37(i):1-96; I. Fujimoto et al., „Epidemiologic Study of Carvinoma in Situ of the Cervix," Journal of Reproductive Medicine 30(7):535 (juli 1985); C. LaVecchia, et al., „Reproductive Factors and the Risk of Hepatocellular Carcinoma in Women," International Journal of Cancer, 52:351, 1992.

[111] Dr. Joel Brind, „Comprehensive Review and Meta-Analysis of the Abortion/Breast Cancer Link"; http://members.aol.com/DFjoseph/brind.html.

[112] Brinton LA, Hoover R, Fraumeni IF, Ir. (1983) British Journal of Cancer, 47:757-62.

[113] Linn, „Outcame of Subsequent Pregnancies," 136-40.

[114] John A. Richardson & Geoffrey Dixon, „Effects of Legal Termination on Subsequent Pregnancy," British Medical Journal (1976): 1303-4.

[115] Herman, Trauma and Recovery, (New York: Basic Books, 1992), 34; „Abortion's Adverse Physical and Psychological Effects on Women" (list of studies).

[116] www.afterabortion.org.

[117] David C. Reardon, „Major Psychological Sequelae of Abortion," 1997, Elliot Institute.

[118] „Tearing Down the Wall," LifeSupport, Spring-Summer 1991, 1-3.

[119] Sí Alcorn, ProLife Answers, 118-20, 285-86.

[120] Ókeypis kunning og ráðgeving fæst á www.lifeissues.org/men/.

[121] Gissler M, Berg C, Bouvier-Colle MH, Buekens P., „Pregnancy-Associated Mortality After Birth, Pontaneous Abortion or Induced Abortion in Finland, 1987-2000," Am J Ob-Gyn 2004; 190:422-27.

[122] Centers for Disease Control, Morbidity and Mortality Weekly Report, 52 (SS12); 1-32, „Abortion Surveillance – United States, 2000," 32.

[123] James A. Miller, „A Tale of Two Abortions," Human Life Internationals Reports, mars 1991, 1.

[124] John Willke, Abortion Questions and Answers (Cincinnati, OH: Hayes Publishing Co., 1988), 99; Brian Clowes, Facts of Life, „Maternal Deaths Due to Abortion," Human Life International; 2nd ed. (juni 2001).

[125] Wanda Franz, „Abortion Associated with Heightened Mortality Rate, Study Reveals," www.nrlc.org/news/2002/NRL09/franz.html.

[126] Elizabeth Ring-Cassidy & Ian Gentles, Women's Health After Abortion: The Medical and Psychological Evidence, 2nd ed. (de Veber Institute, 2003), www.deveber.org.

[127] „Key Facts About Abortion," Elliot Institute, n.d., www.afterabortion.org.

[128] Shettles & Rorvik, Rites of Life (Grand Rapids, MI: Zondervan, 1983), 129.

[129] Jean Staker Garton, Who Broke the Baby? (Minneapolis, MN: Bethany House Publishers, 1979), 76.

[130] „Who Has Abortions?" The Alan Guttmacher Institute, www.agi-usa.org/pubs/fb_induced_abortion.html.

[131] „Abortion: Facts at a Glance," Planned Parenthood Federation of America, n.d., 1.

[132] John Wilke, Abortion Questions and Answers (Cincinnati, OH: Hayes Publishing Co., 1988), 146-50.

[133] Sue Reily, „Life Uneasy for Woman at Center of Abortion Ruling," The Oregonian, 9. mei 1989, A2.

[134] „Jane Roe Wants to Make Legal History Again," 21. juni 2003, www.theage.com.au/articles/2003/06/20/1055828492398.html.

[135] Feminists for Life Debate Handbook (Kansas City, MO: Feminists for Life of America, n.d.), 14.

[136] Frederica Mathewes-Green, „Ask the Victims," Citizen Magazine 2000, family.org/cforum/citizenmag/features/a0013078.cfm.

[137] W. Peacock, „Active Voluntary Euthanasia," Issues in Law and Medicine, 1987. Cited by John Willke, Abortion Questions and Answers (Cincinnati, OH: Hayes Publishing Co., 1988), 212.

[138] National Vital Statistics Report, vol. 48, no. 3, 28. mars 2000.

[139] March of Dimes Foundation, 2003, www.marchofdimes.com/professionals/681_1164.asp.

[140] World Congress og Families Update, vol. 3, issue 1119, mars 2002, www.worldcongress.org/WCFUpdate/Archive03/wcf_update_311.htm citing R. E. Gilbert, et al., „Screening for Down Syndrome: Effects, Safety, and Cost-Effectiveness of First- and Second-Trimester Strategies"; and Euan M. Wallace and Sheila Mulvey, „Commentary: Results May Not Be Widely Applicable," BMJ 2001; 323:1-6 (25. august 2001); www.bmj.com.

[141] Willke, Abortion Questions, 211.

[142] „Born Unwanted: Developmental Consequences for Children of Unwanted Pregnancies," Planned Parenthood Federation of America, n.d.

[143] The Michael Fund, 400 Penn Center, Pittsburgh, PA 15146.

[144] Report of the National Center of Child Abuse and Neglect, U.S. Department of Health and Human Services, 1973-1982.

[145] www.acf.hhs.gov/programs/cb/publications/cm01/chapterthree.htm#victim.

[146] Edward Lenoski, Heartbeat 3 (desember 1980); endurgivið av John Willke, Abortion Questions and Answers (Cincinnati, OH: Hayes Publishing Co., 1988), 140-41.

[147] Nancy Michels, Helping Women Recover from Abortion (Minneapolis, MN: Bethany House Publishers, 1988), 168.

[148] Philip G. Ney, „A Consideration of Abortion Survivors," Child Psychiatry and Human Development (várið 1983): 172-73.

[149] Philip G. Ney, „Relationship Between Abortion and Child Abuse," Canadian Journal of Psychiatry (november 1979): 611-12.

[150] Michels, Helping Women Recover, 169-70.

[151] Endurgivið av James Dobson, Focus on the Family útvarpssending, 21. juni 1991.

[152] Peter Singer, Rethinking Life and Death (New York: St. Martin's Griffin, 1996), 217.

[153] Frederica Mathewes-Green, Real Choices (Sisters, OR: Multnomah Publishers, 1995), 19.

[154] David Reardon, Aborted Women: Silent No More (Westchester, IL: Crossway Books, 1987), 10.

[155] 1989 Adoption Factbook, The National Council for Adoption (Washington, DC, juni 1989), 158. Hesi tølini eru lutfalsliga tey somu í 2000 sambært telefonsamrøðu 5. august 2000 við umboð fyri NCFA, ið váttaði, at í minsta lagi 1 millión pør í barsburðaraldri uppfyltu minstu ættleiðingarkrøvini fyri nýføðingar í USA.

[156] Endurgivið av Charmaine Yoest, „Why Is Adoption So Difficult?" Focus on the Family Citizen, 17. desember 1990, 10.

[157] Vitnisburðir frá starvsfólki á klinikk í The Abortion Providers, eitt sjónband, framleitt av Pro-Life Action League, Chicago. Váttað av Carol Everett, fyrrverandi eigara av fosturtøkuklinikk í privatari telefonsamrøðu millum hana, Frank Peretti og høvundin 24. mei 1991.

[158] Mathewes-Green, Real Choices, 14-15.

[159] Yoest, „Why Is Adoption Difficult?" 10.

[160] http://encyclopedia.adoption.com.

[161] www.bethany.org;
www.cwa.org/links.html;

www.preciouskids.org/adopt/resources.html;
www.adopting.com/info/html.

162 Swopes, „Abortion: A Failure to Communicate,“ www.firstthings.com/ftissues/ft9804/articles/swope.html.

163 Family Planning Perspectives, juli-august 1996, 12.

164 www.lifeservices.org/pace.htm;
www.afterabortion.org/healing;
www.afterabortion.org/resourc.html.

165 www.optionline.org.

166 www.catholic.net/RCC/Prolife/prolife1.html.

167 www.provita.fo, provita@provita.fo.

168 www.atcmag.com/v1n4/article6.asp;
www.epm.org/articles/rosegard.html.

169 Bók mín, ProLife Answers to ProChoice Arguments, er eitt gjølligt aftursvar til uppáhaldini hjá teimum, ið tala fyri fría valinum.

170 Sí Randy Alcorn, ProLife Answers, Appendix K: ProLife Resources, 381-404. Sí eisini www.prolife.org/ultimate.

171 Randy Alcorn, Does the Birth Control Pill Cause Abortions? (Gresham, OR: Eternal Perspective Ministries, 1997, 2000, 2004); www.epm.org/bcp.html; Drs. Walter Larimore & Joseph Stanford, „Postfertilization Effects of Oral Contraceptives and Their Relation to Informed Consent,“ Archives of Family Medicine 2000; 9:133; Dr. Walter Larimore, „The Growing Debate About the Abortifacient Effect of the Birth Control Pill and the Principle of Double Effect,“ Ethics and Medicine Journal, januar 2000; 16(1):23-30. Eisini tøk í dagførdari útgávu á: www.epm.org/articles/pilldebate.html.

172 www.family.org/pregnancy/general/A0028208.html.

173 Á www.epm.org er sera nógv tilfar at heinta.

174 Life Is Sacred, www.family.org/resources/itempg.cfm?itemid=1072.

175 www.abortionno.org/pdf/order.pdf.